| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>15. desember 2016 | Blað nr.: 13655 |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 15. desember 2016 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Elin Lindenskov
Sjúrður Olsen
Sigrún Mohr

**LUTTÓKU EISINI:**
Mikael Viderø
Ingunn Eiriksdóttir
Sigurð Ó. Vang
Randi Saxov

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>15. desember 2016 | Blað nr.: 13656<br>Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 322/16 | 16/00042-1 | Mál beind í nevndir 2016 | 13658 |
| 323/16 | 14/03408-18 | Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064) | 13660 |
| 324/16 | 16/02663-1 | Skúlastýrir – menning og eftirmeting | 13671 |
| 325/16 | 15/01335-38 | Tórshavnar Musikkskúli - staðseting av musikkskúlanum | 13674 |
| 326/16 | 16/02717-6 | Áheitan vegna kirkjuráðið á Argjum um fund um ymiskar fyrispurningar í sambandi við byggjan av nýggjar kirkju á Argjum | 13693 |
| 327/16 | 16/01243-4 | Trivnaðarnevndin: Umbøn frá eldraráðum um broyting av viðtøkunum, soleiðis at heimild verður fyri at útgjalda fundarpening e.l. | 13694 |
| 328/16 | 15/03760-1 | Talgild plássávísingarskipan til dagstovnaøkið | 13697 |
| 329/16 | 15/01400-1 | Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl | 13700 |
| 330/16 | 15/04601-1 | Verkætlan - Tørvur og strategi - bústaðarmøguleikar til eldri | 13704 |
| 331/16 | 16/02101-1 | Møgulig søla av Dagstovninum millum Bóla | 13708 |
| 332/16 | 14/00613-43 | Keyp av vinnubygningi á Hjalla 15, matr. 100, Hoyvík (2013-0466) | 13710 |
| 333/16 | 16/04490-2 | Víðarisøla matr. nr. 1322k, Tórshavn. | 13713 |
| 334/16 | 16/04491-2 | Matr. nr. 13221, Tórshavn. Víðarisøla av ognini. Seljari. P/F Føroya Møblasøla. Keypari. Bústaðir. | 13714 |
| 335/16 | 16/04447-1 | Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Karlamagnusarbreyt | 13715 |
| 336/16 | 14/01477-5 | Fríøkið við Myllutjørn - Karlamagnusarbreyt | 13716 |
| 337/16 | 16/03852-2 | Karlamagnusarbreyt. Møgulig umskipan av byggifeltunum nr. 23 og 25 á Karlamagnusarbreyt. | 13719 |
| 338/16 | 16/03091-2 | Gøtunavn til útstykking undir Kongavarða, matr. nr. 255a, Argir | 13721 |
| 339/16 | 15/00790-6 | Dagføring av vegnum undir Bryggjubakka- við uppihaldstrappuna har Perlan hevur staðið | 13723 |
| 340/16 | 15/01720-1 | Uppskot til broyting av almennu byggisamtyktini fyri B6 vinnuøkið Yviri við Strond | 13726 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 341/16 | 14/00670-33 | SEV. Umsókn um at leigusáttmálin um undirlendið undir vindmylluparkini í Húsahaga, verður fluttur til VIndfelagið Húsahagi P/F ( Undir Stovnan ) | 13730 |
| 342/16 | 15/01762-1 | Staðseting av campingøki í Hesti | 13731 |
| 343/16 | 15/04352-4 | Undirskriftir frá íbúgvum í Traðabrekku um trupul atkomuviðurskifti, at eystari endin á vegnum verður bundin í Hoyvíksvegin | 13734 |
| 344/16 | 16/00393-3 | Umsókn um at kommunan tekur yvirtekur vegastubba á matr. 790r Tórshavn - á Heiðavegi 6 - vegaatgongd til nr. 8. | 13738 |
| 345/16 | 16/04347-1 | Planlegging av kloakkskipan á Stadionøkinum | 13739 |
| 346/16 | 16/04362-1 | Kloakk í Villingardalsvegnum í samband við nýggja fjarhitaleiðing. | 13740 |
| 347/16 | 16/00040-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2016 | 13741 |
| 348/16 | 16/04262-1 | Umbøn um eykajáttanir fyri 2016 | 13743 |
| 349/16 | 16/02542-10 | Skúlabygnaður fyri framtíðar miðbýarskúla | 13747 |
| 350/16 | 16/03666-1 | Nýtt samstarv um ruskspannir í Tórshavnar kommunu | 13750 |

## ***322/16 Mál beind í nevndir 2016***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 5/16 | 16/00042-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 34/16 | 16/00042-1 |
| 3 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 69/16 | 16/00042-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 97/16 | 16/00042-1 |
| 5 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 125/16 | 16/00042-1 |
| 6 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 159/16 | 16/00042-1 |
| 7 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 200/16 | 16/00042-1 |
| 8 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 242/16 | 16/00042-1 |
| 9 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 293/16 | 16/00042-1 |
| 10 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 322/16 | 16/00042-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Tikið til eftirtektar.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>15. desember 2016 | Blað nr.: 13659 |
| | | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Tikið til eftirtektar.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>15. desember 2016 | Blað nr.: 13660 |
| | Formansins merki: |

## 323/16 Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 151/14 | 14/03408-18 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.06.2014 | 203/14 | 14/03408-18 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 148/14 | 14/03408-18 |
| 4 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 207/14 | 14/03408-18 |
| 5 Mentamálanevndin | 11.02.2015 | 22/15 | 14/03408-18 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.05.2015 | 72/15 | 14/03408-18 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2015 | 117/15 | 14/03408-18 |
| 8 Mentamálanevndin | 19.10.2015 | 209/15 | 14/03408-18 |
| 9 Tekniska nevnd | 20.10.2015 | 112/15 | 14/03408-18 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 199/15 | 14/03408-18 |
| 11 Býráðsfundur | 21.10.2015 | 173/15 | 14/03408-18 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 236/15 | 14/03408-18 |
| 13 Fíggjarnevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 14 Býráðsfundur | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 15 Mentamálanevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 16 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 12/16 | 14/03408-18 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 24/16 | 14/03408-18 |
| 18 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 52/16 | 14/03408-18 |
| 19 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 38/16 | 14/03408-18 |
| 20 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 133/16 | 14/03408-18 |
| 21 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 158/16 | 14/03408-18 |
| 22 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 128/16 | 14/03408-18 |
| 23 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 222/16 | 14/03408-18 |
| 24 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 162/16 | 14/03408-18 |
| 25 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 273/16 | 14/03408-18 |
| 26 Mentamálanevndin | 27.10.2016 | 275/16 | 14/03408-18 |
| 27 Fíggjarnevndin | 27.10.2016 | 364/16 | 14/03408-18 |
| 28 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 247/16 | 14/03408-18 |
| 29 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 367/16 | 14/03408-18 |
| 30 Mentamálanevndin | 24.11.2016 | 300/16 | 14/03408-18 |
| 31 Fíggjarnevndin | 29.11.2016 | 396/16 | 14/03408-18 |
| 32 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 297/16 | 14/03408-18 |
| 33 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 323/16 | 14/03408-18 |
| 34 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 312/16 | 14/03408-18 |
| 35 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 404/16 | 14/03408-18 |

### Málslýsing:

**2012-1064/17 SG**

**Fyrireika bygging av nýggjum skúla**

Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021 (sí mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, verður m.a. mælt til at byggja nýggjan trý sporaðan skúla í

staðin fyri Tórshavnar kommunuskúla og Venjingarskúlan. Mælt verður eisini til at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum. Haraftrat er lagt upp til at hava tilboð til næmingar við serligum avbjóðingum.

Hesin nýggi skúlin hevur arbeiðsheitið Vesturskúli við tað, at hann ætlandi verður staðsettur í Vesturbýnum inn frá Landavegnum, har økið eisini er lagt av til at byggja ítróttahøll. Inn frá Marknagilsvegnum verður miðnámsskúladepilin granni.

Tørvur er á at gera uppskot til eitt meira útgreinað konsept bæði um samlaða virksemið í skúlanum og bygningin sjálvan. Hetta arbeiðið er at meta sum ein fyrsta fyrireiking og hugskotsgrundarlag fyri víðari politiskari viðgerð og støðutakan til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at seta arbeiðsbólk við umboðum fyri umsitingina, skúlarnar, frítíðarskúlarnar og møguliga onnur at gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlanum at lata mentamálanevndina aftur til viðgerðar í seinasta lagi 15. juni 2012.

**Mentamálanevndin 30. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur latið gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlan, sí frágreiðing. Arbeiðsbólkurin hevur m.a. lýst námsfrøðiliga profilin við atliti at eitt nú ætlanini um deildarbýti, floks- og hølisbýti, samstarv millum lærarar og pedagogar, samstarv millum skúlar, serundirvísing og næmingatrivnað. Harumframt verður nomið við staðsetingina, bygningsstødd v.m.

Konseptið er í góðum samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingarnar frá skúlastýrunum (máltal 2011-0679).

Mett verður, at tilfarið, ið arbeiðsbólkurin hevur latið úr hondum, saman við álitinum um skúlabygnað og skúlabygging og viðmerkingunum frá skúlastýrunum er haldgott grundarlag fyri at fara víðari í tilgongdini at fyrireika bygging av nýggjum Vesturskúla. Næsta stigið er sostatt at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá.

Til endamálið skal fígging fáast til vega. Í sambandi við heildarætlanina fyri Kommunuskúlan eru uml. 3 mió kr. ikki brúktar. Nýggi Vesturskúlin er ein samanlegging av Kommunuskúlanum og Venjingarskúlanum, og tí verður mett, at hesir pengar kunnu játtast og flytast til nýggju skúlaætlanina fyri hesar báðar skúlar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá til nýggjan Vesturskúla í samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging, og at áður játtað upphædd kr. 3 mió frá kontu 4175 Dagføring av skúlum L41003 Kommunuskúlin høvuðsumvæling verður flutt til bygging av nýggjum Vesturskúla.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri leiðslur, lærarar og foreldur í skúlastýrunum í Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og umboðum fyri umsitingina (sí mál nr. 14/00423) hevur gjørt uppskot um bygnaðarliga samskipan og samanlegging av Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og tíðarætlan.

Á býráðsfundi 22. mai 2014 varð samtykt at broyta ætlaða talið av sporum í Vesturskúlanum soleiðis, at trý spor vera í yngru flokkunum og fimm spor í 8. og 9. flokki (sí mál nr. 14/00423).

Grundøkið við Landavegin, sum ætlanin er at byggja skúlan á, er 34.000 $m^2$, til samanberingar eru grundøkini hjá Skúlanum við Løgmannabreyt og Skúlanum á Argjahamri ávikavist 22.000 $m^2$ og 20.000 $m^2$.

Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið, sum ein arbeiðsbólkur læt úr hondum í juni 2012, og nevndin er samd um, at tað uppskotið er gott grundarlag at brúka í fyrireikingini at byggja nýggja skúlan í vesturbýnum.
Á fundi mikudagin 18. juni 2014 samtykti bygginevndin at biðja um, at 1.300.000 kr., sum settar eru av til av Vesturskúla, verða játtaðar til fyrireiking og til byggiskrá.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 1.300.000 kr. til fyrireiking og útvegan av byggiskrá av konto 4176 Nýbygging av skúlum.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Støðan í dag.

Tøkt lendi, sum ætlanin er at byggja á:

| | | |
|---|---|---|
| Matr.nr. | 1099 | 14.660 m² |
| Matr.nr. | 1100 | 15.280 m² |
| Matr.nr. | 1102c | 5.879 m² |
| | | |
| Tilsamans | | 35.819 m² |

Hesir matriklar eru allir D3-øki Almennir stovnar.

Samtykt er, at skúlin skal byggjast til 850 næmingar, og við grundarlagi í verandi skúlum við Løgmannabreyt og á Argjahamri eru umleið 14 m² fyri hvønn næming.
Nýggi skúlin skal sostatt vera 850 x 14 m² = 11.900 m² til støddar.

Neyðugt er at útvega meiri lendi, tí serstaka byggisamtyktin fyri Marknagil ásetur nettonýtslustig 0,3, sum krevur eitt grundøkið uppá 39.700 m².

Ætlanin er at nýta matr.nr. 1104d ella partar av hesum matrikli afturat. Kommunan eigur grundøkið, sum er 6.576 m² til støddar.

Soleiðis verður samlaða víddin økt úr 35.819 m² til 42.395 m².

Bygginevndin hevur á fundi 11. desember 2014 samtykt at mæla til, at matr.nr. 1104d verður lagt afturat samlaða økinum til Vesturskúlan.

Upplýsast skal, at matr.nr. 1104d er C3-øki Miðstaða- bústaðarbygging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur fingið 1.part av byggiskránni (Byggiskrá Fyritreytir) og mælir til at góðkenna hana við tí fyrivarni, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingingini, áðrenn útbjóðað verður.

Víst verður til skjal 15/01528-2, sum er viðfest.

Sambært tíðarætlanini verða 2. og 3. partur av byggiskránni lidnir í september. 2. partur er námsfrøðilig viðurskifti og 3. partur er teknisk viðurskifti.

**Tilmæli til mentamálanevndina:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og góðkenna fyrsta part av byggiskránni.

**Ískoyti:**
Eftir at málið var fyri í mentamálanevndini, hevur fundur verið á teknisku deild við luttøku av umboðum fyri Landsverk og Rambøll um atkomuviðurskiftini til Vesturskúlan. Niðurstøðan frá fundinum var, at Rambøll skuldi koma við einum uppskoti til loysn og gera eina innkoyring frá Marknagilsvegnum ígjøgnum nevnda matr.1104d.
Mál 14-03118-22. Hjáløgdu kort sum vísa uppskot til loysn.

**Tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina:**
Tekniski stjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og teknisku deild og nýta matr. nr. 1104d fyri at halda kravið um nettunýtslustig til byggingina og møguligan atkomuveg frá Marknagilsvegnum til Vesturskúlan.

**Mentamálanevndin 6. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til mentamála-nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 12. oktober 2015 samtykt endaliga byggiskrá fyri byggiverkætlanina Skúlin á Fløtum. Byggiskráin, ið er hjáløgd, er í trimum pørtum:

1. Fortreytir
2. Námsfrøðilig viðurskifti
3. Teknisk viðurskifti

**Grundøki**
Eitt øki í Marknagili er lagt av til Skúlan á Fløtum www.saf.fo . Økið er tilsamans 42.335 m$^2$ og er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil kunnu bygningurin/bygningarnir í mesta lagi vera 10.583 m$^2$ við tilsamans 12.700 innrættaðum m$^2$. Støddin á skúlanum verður 11.600 m$^2$ við møguleika at byggja út til tveir flokkar aftrat í 7. árgangi.

**Kostnaður**
Metta samlaða íløgan til handverkaraútreiðslur uttan meirvirðisgjald verður:
11.600 m$^2$ av gólvvídd fyri 11.600 m$^2$ x 20.000 kr.= 232.000.000 kr.

**Tíðarætlan**
Byggingin verður skipað sum ein bygging í trimum byggistigum. Sambært tíðarætlanini verður fyrsta byggistig liðugt í juli 2018, og tá flytur miðdeildin (4.- 6-fl.) inn í skúlan. Annað

byggistig er til hádeildina (7.-9.fl.), og tað verður liðugt í juli 2019. Í juli 2020 verður triðja byggisstig liðugt, og tá flytur grunddeildin (0-3- fl. og frítíðarskúli) inn í skúlan.

Málið verður viðgjørt í mentamálanevndini, tekniskunevnd, byggi- og býarskipanarnevndini, fíggjarnevndini og í býráðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjóri og býararkitekturin mæla mentamálanevndini til at góðkenna byggiskránna og at beina málið víðari til teknisku nevnd, ið skal beina málið víðari til byggi- og býarskipanarnevndina, ið skal beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í avvarðandi nevndir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at nevndin tekur undir við byggiskránni fyri tann partin sum viðkemur vegaføringar, ferðsluviðurskiftir og leiðingar í sambandi við verkætlanina, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Timæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við byggiskránni, fyri tann partin, sum viðkemur býarskipan og staðseting, og at beina málið í býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at góðkenna byggiskránna og at beina málið í býráðið, og heitt verður samstundis á teknisku nevnd um í góðari tið at skipa øll nøktandi vega- og ferðsluviðurskifti við skúlarnar.

**Býráðsfundir 21. oktober 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti at góðkenna byggiskránna.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri Skúlan á Fløtum var útskrivað 23. oktober 2015 eftir at Tórshavnar býráð 21. oktober 2015 hevði samtykt byggiskránna fyri Skúlan.

Fýra ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey vóru:
- Elvi (Selmar Nielsen Arkitektar, Ósbjørn Jacobsen Arkitektar, LBF og SMJ)
- BIGKONTRAST (BIG-Bjarke Ingels Group, Kontrast byggilist og byggifrøði, LBF, SMJ)
- Árni Winter arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF
- MAP Arkitektar, Arkitektar 99, LBF og PB-Consult

18. desember 2015 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og var tað latið navnloynt soleiðis, at nevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

4. januar 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat ráðgevaratoymið skal fáa møguleikan at innganga avtalu um ráðgeving, projektering og eftirlit av skúlabyggingini. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um projektering og eftirlit, og at venda aftur við einum uppskoti til sáttmála.

**Mentamálanevndin 6. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. januar 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. januar 2016:** Einmælt samtykt at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og heimila umsitingini at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið: Árni Winther arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF og uppskoti teirra, Eindirnar í heildini.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur á fundi 9. februar 2016 samtykt samráðingarúrslitið frá samráðingunum hjá samráðingartoyminum (umboð frá bygginevnd og teknisku fyrisiting) við vinnandi ráðgevaratoymið í hugskotskappingini. Talan er um samtak, ið eitur Samtakið Eind Í/F (undir stovnan).

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini til at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, fílist á, at tilmælið við tilfari kom ikki fyrrenn á sjálvum fundinum og tekur ikki støðu til málið í dag.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**

Verkætlanin er komin so mikið áleiðis at klárt er at fara undir jørðarbeiðið. Í fyrsta lagi avgrevstur, ið m.a. skal geva betri yvirlit til víðari jørðarbeiði t.e. spreinging, grovplanering, planering vm.

Útboð hevur verið av avgrevstrinum. Kostnaðarmetingin lá millum 1,1 og 1,4 mió. kr.

2 arbeiðstakarar vóru bodnir at bjóða. Lisitatión var 3. mai 2016 kl. 14.

Tilboðini vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| P/F Articon | kr. 1.294.147 |
| H. V. Lützen | kr. 1.772.448 |

Ikki íroknað MVG.

Farast kann í holt við arbeiðið innan umleið 3 vikur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka undir við at gera sáttmála við lægsta tilboðsgeva og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Sáttmálin væntast klárur til viðgerðina í figgjarnevndini.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndni og beina málið í býráðið.

***Býráðsfundur 19. mai 2016: Einmælt samtykt.***

*Ískoyti*
*Á karminum eru fyri 2016 játtaðar 30,8 mio.kr. á stovnsnr. 4174 – Nýbygging skúlar (íløgur). Projekteringin av skúlanu er nú gott ígongd, umframt at jørðarbeiðið er um at fara í gongd. Tørvur er á áleið upphæddini til virksemi í ár.*

*Tilmæli*
*Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla at játta 30,8 mio.kr. á projektkonto L41012.*

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Eftir at fyrra útbjóðingin bleiv annulerað í summar hevur bygginevndin saman við Ráðgevarasamtakinum Eind gjøgnumgingið skipanaruppskotið vm. og gjørt ávísar tillagingar. Yvirlit sæst í hjálagda skjali.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka tillagingarnar til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
20. oktober 2016 kl. 14 var licitatión uppá bygging av nýggjum skúlabygningi til Skúlan á Fløtum.

Hesi feløg/samtøk vóru boðin at bjóða í innbodnari licitatión og teirra høvuðsboð eru:

P/F MT Højgaard Føroyar við undirarbeiðstakarum - 287.151.814 kr.
P/F J&K Petersen, Sp/f Húsavarðatænastan og Sp/f TG Verk við undirarbeiðstakarum - 298.955.524 kr.
(eisini nevnt: Samtakið í Havn)
P/F Articon og Sp/f Búsetur við undirarbeiðstakarum - 267.809.320 kr.

Høvuðsráðgevin Samtakið Eind Í/F hevur, eftir innanhýsis viðgerð og gjøgnumgongd av tilboðunum, saman við umboðum fyri Tórshavnar kommunu, latið tilmæli 26. oktober 2016 viðvíkjandi hvat av samtøkunum skal fáa í boði at gera eina partalagsavtalu (fasu I) og har ætlandi raka ein targetprís, sum síðani vil innibera eina endaliga partalagsavtalu (fasu II) og ein arbeiðstøkusáttmála.

Henda tilgongdin kemur ætlandi at byrja 1. november 2016 og gongur fram til í januar 2017, tá komið ætlandi verður aftur í nevndir og býráð við einum úrsliti og tilmæli.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur 26. oktober 2016 viðgjørt tilmælið frá Samtakinum Eind og umrøtt málið saman við teknisku fyrisiting. Bygginevndin tekur undir við tilmælinum frá Samtakinum Eind (sí tilmælið á nevndarportalinum).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara í partalag (fasu I) við lægsta tilboðsgeva. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 27. oktober 2016:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála og kostnaðarmeting verður tøkt til fundin. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við

lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at innganga arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiði fíggjað av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Mett verður, at samlaði íløgutørvurin til byggingina av Skúlanum á Fløtum fíggjarárið 2017 verður umleið kr. 70 mió.

Í uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2017 eru settar kr. 42,075 mió av til endamálið. Í hesum sambandi er fráboðað, at írestandi fíggingin til komandi fíggjarár kr. 28 mió skal játtast sum eykajáttan í inniverandi fíggjarári av løgukarmi 5175 Musikkskúlin.

Partalagssáttmáli er undirskrivaður. Umframt avgrevsturin, sum er liðugur, verður grót- og spreingiarbeiðið byrjað í ár, og byggingin av sjálvum bygninginum byrjar ætlandi í apríl 2017.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjóri mæla til at samtykkja eykajáttan kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 24. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum við teirri viðmerking, at meirinntøkurnar fyri fíggjarárið 2016 skulu játtast til arbeiðið at byggja Musikkskúlan og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið at viðgera tvær ferðir.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála er gjørt, kostnaðarmetingin fyri arbeiðið er kr. 7.386.512 u/mvg. Harumframt koma útreiðslur til byggipláss uml. kr. 500.000 og mvg, samlaður kostnaður umleið kr 8.500.000. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at inganga arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiðið og játta kr. 8.500.000 av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

# 324/16 Skúlastýrir – menning og eftirmeting

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 31.08.2016 | 225/16 | 16/02663-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 05.10.2016 | 252/16 | 16/02663-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 267/16 | 16/02663-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 30.11.2016 | 307/16 | 16/02663-1 |
| 5 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 324/16 | 16/02663-1 |

**Málslýsing:**

Í visjónini fyri Tórshavnar Kommunu er m.a. ásett, at høvuðsstaðurin skal vera virkin við nýggjum og mennandi útbúgvingartilboðum og at høvuðsstaðurin er effektivur og framtakshugaður við skjótari og góðari tænastu til borgarar og vinnu.

Ein týðandi táttur í virkseminum innan mentamálaøkið eru fólkaskúlarnir, bæði við atliti til rakstur og ikki minst týðandi íløgur til bygningar og amboð. Leiðsluskipanin kring fólkaskúlan er samansett, har bæði Mentamálaráð, kommuna hava ymsar leiklutir, umframt lokala leiðslan samansett av skúlaleiðslu og skúlastýri.

Sum liður í at tryggja framhaldandi menning av skúlaskipanini er eftirmeting ein týðandi táttur soleiðis at mentamálanevnd, býráð og umsiting leypandi kann meta um møgulig átøk o.a. Tað verði seg viðvíkjandi formliga regluverkinum kring virksemi ella innihaldið. Ætlanin er í stigum at taka ymsar tættir upp kring fólkaskúlan. Ítøkiliga eru tvær verkætlanir í gongd – mál 15/04019 Skúlin á Fløtum: Teldlar og eftirmeting sum er til viðgerðar á fundinum 31. august 2016, umframt mál 15/03757 Nám X, eftirmeting og møguligar bygnaðarbroytingum, sum kemur til nevndarviðgerð í oktober.

Í heyst er skúlastýrisval og verður tí mett hóskandi at hyggja nærri eftir virkseminum í skúlastýrunum í nú skjótt farna tíðarskeiði við atliti til at meta um møgulig stig og átøk innan økið.

Í rundskrivi frá 4. oktober 2012 um meginreglur fyri skúlastýri er ásett í § 10. "Um so er, at fleiri skúlar eru í einari kommunu, kann kommunustýrið skipa fyri ráðleggingar- og kunningarfundum fyri skúlastýrum, skúlastýrisformonnum og skúlaleiðarum til tess at stimbra og menna skúlaskapin í økinum."

Mentamáladeildin/trivnaðarfyrisitingin hevur komandi mánaðirnar í hyggju at eftirmeta virksemi í skúlastýrunum, soleiðis at umsitingin kann verða betri til reiðar at stuðla undir virksemi í skúlastýrunum, umframt at meta um møguligar tillagingar.

Ætlanin er í sept. at skipa fyri fundi fyri skúlastýrisformonnunum/-kvinnunum í teimum 10 kommunalu fólkaskúlunum, umframt at gjøgnumganga ársfrágreiðingar og gerðabøkur hjá skúlunum fyri farna skúlaár. Eisini er ætlanin at umrøða við formennirnar/-kvinnurnar, hvat tey meta kann gerast fyri at styrkja um funktiónina, møgulig átøk í komandi valskeiði vm., umframt at umrøða hvussu og í hvønn mun kommunan kann virka fyri at flest møgulig foreldur sýna skúlastýrisvalinum 8. november og arbeiðinum áhuga.

Ætlandi kemur umsitingin at gera eina frágreiðing til mentamálanevndina seinni í ár við møguligum tilmælum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða ætlanina.

**Mentamálanevndin 31. august 2016:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Umsitingin kemur at kunna um ávegis niðurstøður frá hoyringsfundi við skúlastýrisforkvinnur/formenn 3. oktober 2016.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2016:** Útsett.

**Ískoyti**
Kunnað verður um fund við formenn og forkvinnur í skúlastýrunum.
Fundarfrágreiðing er hjáløgd eins og kanning hjá felagnum Heim og Skúli frá 2013.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Nevndin hevur umrøtt eftirmetingina av virkseminum hjá skúlastýrum og mælir til at fyrisitingin ger uppskot til vegleiðing av nýggjum skúlastýrislimum. At fyrisitingin eina til tvær ferð um árið skipar fyri felagsfundum fyri forkvinnum/formonnum. Mælt verður til, at í mesta lagi ein býráðslimur verður limur í hvørjum skúlastýri. Mælt verður til at mannagongd verður ásett í sambandi við, at skúlastýri skulu viðgera persónsmál, og at MMR verður kunnað um eftirmetingina og tilgongdina í Tórshavnar kommunu.

**Ískoyti**

Uttanhýsis umboð fyri kommunustýrið í skúlastýrum valt av býráðnum

Mentamálanevndin hevur á fundi 17. oktober 2016 samtykt at í mesta lagi ein býráðslimur verður limur í hvørjum skúlastýri. Hitt umboðið verður ætlandi framyvir valt av av býráðum lutað til umboð fyri t.d. vinnuna, arbeiðsmarknaðin, miðnámsútbúgvingarstovn ella frítíðarfelagsskap.

Ætlanin er, at hesi umboð skulu vera við til at styrkja sambandið og samstarvið millum skúla, útbúgvingarstovnar, vinnu, felagsskapir og lokalsamfelagið.
Henda skipan broytir ikki uppá, at forkvinnan ella formaðurin í skúlastýrunum verður valdur millum foreldravaldu umboðini.

Ítøkiliga mannagongdin kann t.d. hvat viðvíkur vinnuumboði vera at heita á Vinnuhúsið ella fakfeløg at vísa á umboð, sum hava áhuga at verða vald sum kommunustýrisumboð í skúlastýrini. Umframt umboð fyri vinnuna, kann talan vera umboð fyri Glasir ella

frítíðafelagsskap. Í serligum førum kann eisini vera talan um, at umboðið er starvsfólk í trivnaðarfyrisitingini/mentamáladeildini. Hetta serliga við atliti til t.d. nýbyrjaðar frískúlar.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til, at býráðið umframt eitt kommunustýrisumboð velur eitt uttanhýsis umboð fyri kommunustýrið í skúlastýrini fyri teir 10 kommunalu fólkaskúlarnar. Harumframt verður mælt til, at eitt umboð fyri fyrisitingina verður valt í skúlastýrið fyri Lítla skúla.

**Mentamálanevndin 30. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Helena Dam á Neystabø var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at beina málið í mentamálanevndina.

## 325/16 Tórshavnar Musikkskúli - staðseting av musikkskúlanum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.03.2014 | 54/14 | 15/01335-38 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 65/14 | 15/01335-38 |
| 3 Býráðsfundur | 22.05.2014 | 117/14 | 15/01335-38 |
| 4 Mentamálanevndin | 22.05.2014 | 126/14 | 15/01335-38 |
| 5 Tekniska nevnd | 17.06.2014 | 206/14 | 15/01335-38 |
| 6 Tekniska nevnd | 23.06.2014 | 219/14 | 15/01335-38 |
| 7 Ferðslunevndin | 18.09.2014 | 65/14 | 15/01335-38 |
| 8 Ferðslunevndin | 26.09.2014 | 67/14 | 15/01335-38 |
| 9 Tekniska nevnd | 08.10.2014 | 240/14 | 15/01335-38 |
| 10 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 209/14 | 15/01335-38 |
| 11 Fíggjarnevndin | 22.10.2014 | 276/14 | 15/01335-38 |
| 12 Ferðslunevndin | 28.10.2014 | 76/14 | 15/01335-38 |
| 13 Tekniska nevnd | 05.11.2014 | 260/14 | 15/01335-38 |
| 14 Mentamálanevndin | 05.11.2014 | 218/14 | 15/01335-38 |
| 15 Fíggjarnevndin | 12.11.2014 | 305/14 | 15/01335-38 |
| 16 Býráðsfundur | 20.11.2014 | 227/14 | 15/01335-38 |
| 17 Mentamálanevndin | 07.04.2015 | 63/15 | 15/01335-38 |
| 18 Fíggjarnevndin | 18.05.2015 | 114/15 | 15/01335-38 |
| 19 Mentamálanevndin | 16.03.2016 | 79/16 | 15/01335-38 |
| 20 Fíggjarnevndin | 17.03.2016 | 120/16 | 15/01335-38 |
| 21 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 96/16 | 15/01335-38 |
| 22 Býráðsfundur | 23.08.2016 | 199/16 | 15/01335-38 |
| 23 Mentamálanevndin | 24.11.2016 | 299/16 | 15/01335-38 |
| 24 Fíggjarnevndin | 29.11.2016 | 397/16 | 15/01335-38 |
| 25 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 296/16 | 15/01335-38 |
| 26 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 313/16 | 15/01335-38 |
| 27 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 403/16 | 15/01335-38 |
| 28 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 325/16 | 15/01335-38 |

**Málslýsing:**
Tórshavnar Musikkskúla tørvar betri hølisumstøður. Nevndin fyri Musikkskúlan hevur áhaldandi gjørt vart við hendan spurningin, og býráðið hevur javnan havt málið til umrøðu.

Nú er ætlanin at taka málið uppaftur. Í hesum umfarinum verður miðað eftir at fyrireika ætlanir at útvega Musikkskúlanum hølir, sum eru ætlað til endamálið, og at gera av, hvar hesi hølir skula vera.

Áhugin fyri at fáa frálæru í Musikkskúlanum er ovurstórur, og ikki er gjørligt at ganga øllum umsóknum á møti. Hetta er m.a. ein spurningur um, hvørja rakstrarjáttan skúlin hevur. Sum er rinda Mentamálaráðið og kommunan raksturin.

Musikkskúlin húsast í dag í mongum ymsum hølum kring um í býnum. Miðstøðin á Frúutrøð er ein gamal barnaskúli, sum hjálpt er uppá, men sum ikki gevur nøktandi umstøður.

Til tess at fáa gongd á fyrireikingar til at útvega Tórshavnar Musikkskúla tíðarhóskandi karmar verður mælt til at játta pening at fara undir neyðugt fyrireikingararbeiði.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 500.000 av kontu 1041-90-41002, Læknamiðstøð í Hoyvík, til staðseting/fyrireiking av musikkskúla, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 2. desember 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Fyrireikingararbeiðið higartil hevur fevnt um møguliga staðseting av nýggjum Musikkskúla og lýsing av hølistørvi.

Samskiftið hevur verið við Norðurlandahúsið um staðseting á økinum eystan fyri Norðurlandahúsið á fløtuni í Sortudýki. Norðurlandahúsið tekur væl undir við hesi staðseting, sum tó ikki skal ganga Norðurlandahúsinum ov nær.

Samskiftið hevur eisini verið við Musikkskúlan – bæði leiðara, umboð fyri lærarar og umboð fyri musikkskúlanevndina – um hølistørvin eins og um krøv til slíkan nýbygning sum heild. Skúlin hevur sent umsitingini meting um dagførdan hølistørv.

Til tess at koma meira ítøkiliga víðari skal avtala gerast við ráðgeva um at fáa gjørt dagførda byggiskrá og skitsuuppskot, sum lýsir ymsar loysnir bæði viðvíkjandi staðseting, skapi og byggilistarligum hugskoti. Fyrireikingararbeiðið er grundarlag fyri viðgerð og avgerð um endalig staðseting og víðari tilgongd. Játtan er til endamálið. Setast skal eisini ein bygginevnd.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at sett verður bygginevnd fyri nýggjum Musikkskúla, og at gjørd verður ráðgevaraavtala um byggiskrá, skitsuuppskot v.m.

**Mentamálanevndin 2. juni 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 24. juni 2010:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Gunnar Mohr

Í bygginevndina vórðu valdir Jógvan Arge og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Fyrireikingararbeiðið er nú komið so mikið áleiðis, at byggiskrá skal gerast. Byggiskráin skal lýsa byggiætlanina, herundir rúmskrá, fermetrar og ymisk funktiónskrøv. Sambært politisk-

fyrisitingarligu mannagongdini fyri verkætlanir fíggjaðar av íløgum, skal faknevndin biðja um byggiskrá, sum bygginevndin síðani útvegar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at biðja bygginevndina útvega byggiskrá, og at tað í hesum sambandi verður játtað kr. 200.000 til endamálið av íløgukontu 5175.

**Mentamálanevndin 9. februar 2011:** Mayfinn Norðoy, arkitektur, greiddi frá projektinum.

Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játtað kr. 200.000 til endamálið av íløgukonto 5175.

**Býráðið 24. februar 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundi 1. juni 2011 samtykti bygginevndin formliga at senda byggi- og býarskipanarnevndini um mentamálanevndina umbøn um at viðgera og góðkenna staðseting av nýggjum Musikkskúla á matrikklarnar 1453a, 1410d (lutur I) og 1409 (lutur I), eigari Tórshavnar kommuna, samsvarandi skitsuuppskoti.

Umbønin hjá bygginevndini skal síggjast í ljósinum av, at arbeiðið við skitsuuppskoti og byggiskrá er um at verða liðugt. Bygginevndin hevur alla tíðina arbeitt við staðseting eystanfyri Norðurlandahúsið á fløtuni í Sortudýki. Bygginevndin hevur mett at henda staðseting er væl egnað til Musikkskúla, tí hetta liggur væl fyri í mun til stóru ferðsluæðrirnar, og at Musikkskúlin og Norðurlandahúsið sum nærmastu grannar fara at fáa gagn av hvørjum øðrum serliga í mun til konsertvirksemi og høli.

Sambært galdandi mannagongd fyri verkætlanir fíggjaðar av íløgum, skal byggi- og býarskipanarnevndin góðkenna staðseting, eftir at avvarðandi faknevnd hevur góðkent byggiskránna.

Staðsetingin og byggiskráin eru ikki viðgjørd av umsitingini á Byggi- og býarskipanardeildini undan hesum fundinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2011:** Málið varð útsett.

**Mentamálanevndin 15. juni 2011:** Samtykt at taka undir við bygginevndini og beina málið víðari í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2011**: Tikið av skrá.

**Býráðið 16. juni 2011:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur fingið byggiskránna og mælir til at góðkenna hana við fyrivarni fyri, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingini áðrenn útbjóðing.

Bygginevndin mælir somuleiðis til at taka upp samráðingar um høvuðsráðgeva og um prosjektering, at undirráðgevingin verður boðin út, og at játtaðar verða kr. 3.800.000 av íløgujáttanini fyri 2011 á kontu 5175 til prosjektering.

Sambært galdandi mannagongd fyri íløguverkætlanir skal tekniska nevnd viðgera og góðkenna tekniska partin. Mentamálanevndin hevur 15. juni 2011 sambært somu mannagongd beint málið um at góðkenna staðseting til byggi- og býarskipanarnevndina. Sambært kommunustýrisskipani § 11, 2. petti skal tilmæli um íløgur til býráðið ganga um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

Í hesum sambandi er at viðmerkja, at samlaði byggikostnaðurin sambært byggiskránni er ikki játtaður og framgongur heldur ikki fult út í mun til langtíðaríløguætlanina árini 2011-2014, og at ikki kann farast undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við bygginevndini, og at taka upp samráðingar við Kontrast um høvuðsráðgeva og um prosjektering. Undirráðgevingin verður boðin út.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla harumframt til at beina tekniska partin fyri teknisku nevnd at viðgera og góðkenna, og at beina tilmælið um at játta kr. 3.800.000 til prosjektering av kontu 5175 í býráðið um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 21. juni 2011:** Nevndin: Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen og Annfinn Brekkstein tekur undir við tilmælinum, tó tekur Annfinn Brekkstein støðu til spurningin um samráðingar um høvuðsráðgeva á seinni fundi.

**Ískoyti:**
Staðsetingin av nýggjum musikkskúla eystanfyri Norðurlandahúsið, er í byggiskránni grundgivin soleiðis:

*"Staðsetingin er vald útfrá verandi funktiónum í økinum við Kringvarpið og Norðurlandahúsið. Eitt mentunarøki sum við einum musikkskúla afturat sær fer at skapa synergi og eitt spinn off sum verður føroyskum tónleiki at frama.*

*Hølisviðurskiftini í hesum trimum húsum koma at komplementera hvørt annað – bæði í sambandi við tónleikatiltøk og gerandisdag. Ùtvarpshúsið og Norðurlandahúsið hava eisini eina hitaskipan sum musikkskúlin ómakaleyst kann knýta seg uppí."*

Grundøkið fevnir um 3 matriklar og er umleið 9499 m² til støddar:

Matr. nr. 1453a,
Eigari er Tórshavnar Kommuna
Støddin er 7016 m2

Matr nr. 1410d (lutur 1)
Eigari er Tórshavnar kommuna
Støddin er 1726 m2

Matr nr. 1409 (Lutur 1)

Eigari er Tórshavnar kommuna
Støddin er 757 m2

Økið er í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu lagt út sum C2-øki, Opin miðstaðarbygging, við hesi áseting: *"Umráðisparturin er í síni heild lagdur til miðstaðarendamál, serstakliga ætlað stovnum, framsýningarhøllum, samkomuhúsum, tónleikahøllum og øðrum mentunarligum stovnum og tílíkum og til tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi, skrivstovur, matstovur o.t."*

Byggistigið má ikki fara upp um 0,25 og nettonýtslustigið ikki upp um 0,3.

Býarskipanarumsitingin hevur ikki havt staðsetingarspurningin til ummælis áðrenn byggiskráin er gjørd liðug. Býarskipanarumsitingin hevur ikki viðgjørt staðsetingina undan hesi nevndarviðgerð. Býarskipanarumsitingin ger tí vart við, at aðrar staðsetingar, har slíkt virksemi eisini kundi ligið væl saman við øðrum mentunarligum og/ella undirvísingarvirksemi, sosum Marknagil, Skálatrøð, Vestara Bryggja v.fl. ikki hava verið viðgjørdar av umsitingini. Uttan hesa viðgerð, kann býarskipanarumsitingin sostatt bert vísa til undanfarna álit um staðseting av musikkskúla, sum býráðið áður hevur viðgjørt.

Viðv. tekniska partinum er sambært byggiskránni upplýst fylgjandi:

***"Parkering og atkoma***
*Vísandi til gjøgnumstreymnin av fólki til og frá skúlanum er umráðandi, at aktoman, av- og áseting og parkeringsviðurskiftini eru nøktandi. Nýggju atkomu og parkeringsviðurskiftini verða soleiðis skipað, at hetta verður lagt yvirav innkoyring til Inn, Tórsbreyt og Kurlu. Pláss verður til uml. 40-50 bilastøðlar. Eisini er møguleiki fyri at gera parkeringshús við "grønum plássi" omaná staðsett upp ímóti ringvegnum. Gøta sambindur ferðslu hjá gangandi millum Sundsvegin og Ringvegin. Mentunarligt rekrativt øki verður skipað, hylur við tilknýti til verandi á- Hugsað er um møguleika fyri t.d. uttandura tónleikatiltøkum.*

*Nógv av- og áseting er knýtt at bygninginum, umframt at nógv trýst er í økinum frammanundan- við ferðslu til m.a. Norðurlandahúsið, Inn, Yndi, Kurlu og Tórsbreyt. Hetta skal havast í huga tá atkomuviðuskiftini vera loyst."*

***Tekniskar veitingar***
*Bindast skal í verandi kommunalar vatn- og kloakkskipanir. Kloakk og aðrar leiðingar í jørð verður partur av skipanaruppskotinum"*

Plan- og rakstrardeildin hevur ikki havt tekniska partin til ummælis áðrenn byggiskráin er gjørd liðug. Plan- og rakstrardeildin ger tí vart við, at ætlaninar sambært byggiskránni viðv. ferðsluloysnum, parkeringstørvi, tekniskum veitingum v.m. ikki eru umrøddar við deildina frammanundan. Vísandi til nógva framførsluvirksemi, sum ætlanin er at hava í bygninginum sambært byggiskránni, og nógva framførsluvirksemi í økinum annars (Norðurlandahúsið og Kringvarpið), tekur plan- og rakstrardeildin fyrivarni fyri, at treytir verða settar í samband við byggimálsviðgerð, um fullfíggjaða ferðsluloysn og nøktandi tal av parkeringsplássum í mun til ætlaða virksemi.

Sambært kommunustýrisskipani § 11, 2. petti skal tilmæli um íløgur til býráðið ganga um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

Í hesum sambandi er at viðmerkja, at samlaði byggikostnaðurin sambært byggiskránni er ikki játtaður og framgongur heldur ikki fult út í mun til langtíðaríløguætlanina árini 2011-2014, og at ikki kann farast undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. juni 2011:** Nevndin samtykti at góðkenna uppskotið til staðseting sambært byggiskránni, og at viðmæla at játta kr. 3.800.000 til projektering av kontu 5175, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 21. juni 2011:** Nevndin samtykti at arbeitt verður víðari við fyriliggjandi uppskoti og vísir á fyrivarni fyri, at treytir verða settar í sambandi við byggimálsviðgerð um fullfíggjaða ferðsluloysn og nøktandi tal av parkeringsplássum í mun til ætlaða virksemið. Samtykt at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 3.800.000 til projektering av konto 5175.

**Býráðið 23. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2011:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2011:** Útsett.

**Ískoyti:**
<u>Høvuðsráðgevasáttmálin</u>:
Samráðst er við S/pf. Kontrast um sáttmála fyri høvuðsráðgeving, prosjekteringsleiðslu og serráðgeving (akustikk, bruni). Samlaða arkitektráðgevaratilboðið er kr. 2.963.419 v/mvg.

<u>Undirráðgevingin</u>:
Verkfrøðingaráðgevingin uppá berandi konstruktiónir, EL-prosjekt og HVS varð boðin út 10. oktober 2011 við freist at geva tilboð tann 14. oktober 2011.

Hesir fingu í boði at bjóða: P/f. LBF, Sp/f. KJ-Elráð, P/f. SMJ, P/f. HMP, Sp/f. PB Consult og Sp/f. M. Leo.

Tilboð komu inn frá Inn komu P/f. LBF, Sp/f. KJ-Elráð, P/f. SMJ og P/f. HMP. Sp/f. M. Leo ynskti ikki at bjóða. Sp/f. PB Consult hevur gjørt vart við, at teir vegna feriu ikki varnaðust útbjóðingina fyrr enn eftir svarfreistina, og hava biðið um at útseta svarfreistina.

Í útbjóðingarbrævinum varð víst á, at fylgjandi viðurskiftir verða tikin við í metingini av einstaka tilboðnum. Vektingin er líka deild yvir øll punktini:

- Samsýning fyri ráðgevingina
- Bygnaður av virki ráðgevans á hesi uppgávu
- Royndir og førleikar hjá virki og prosjektverkfrøðingi og øðrum persónum

Hesi tilboð eru komin inn:

| **Berandi konstruktiónir** | **P/f. LBF** | **P/f. HMP** |
|---|---|---|
| 1. Ráðgeving | kr. 945.355 | kr. 500.000 |

| | | |
|---|---|---|
| 2. Fakeftirlit | kr. 204.100 | kr. 200.000 |
| **Samanlagt** | **kr. 1.149.455** | **kr. 700.000** |
| | | |
| Fyrivarni | Byggitíð 18 mðr. | |

| **EL** | **P/f. LBF** | **Sp/f. K.J. El-ráð** |
|---|---|---|
| 1. Ráðgeving | kr. 397.396 | kr. 396.000 |
| 2. Fakeftirlit | kr. 115.000 | kr. 118.000 |
| **Samanlagt** | **kr. 512.396** | **kr. 514.000** |

| **HVS** | **P/f. SMJ** |
|---|---|
| 1. Ráðgeving | kr. 649.400 |
| 2. Fakeftirlit | kr. 347.500 |
| **Samanlagt** | **kr. 996.900** |
| | |
| Fyrivarni | Byggitíð 12 mðr. |

Við støði í heildarmeting mæla trivnaðarstjórin og tekniski stjórin til at geva umsitingini heimild at fara í samráðingar og gera sáttmála við:

- P/f. HMP um ráðgeving og fakeftirlit viðvíkjandi berandi konstruktiónum
- P/f. LBF um ráðgeving og fakeftirlit viðvíkjandi EL
- P/f. SMJ um ráðgeving og fakeftirlit viðvíkjandi HVS

Fígging:
Lægstu tilboðini fyri ávikavist høvuðsráðgeving og undirráðgeving eru í alt kr. kr. 5.310.796 v/mvg. Harumframt skal roknast við kr. 100.000 til innanhýsis prosjektumsiting og kr. 100.000 til útlegg og ókent.

Samlaður fíggjartørvur til prosjektering er sostatt kr. 5.515.796 v/mvg. Játtaðar eru kr. 3.800.000 til prosjektering, tvs., at tørvur er á írestandi fígging kr. 1.715.796.

**Ískoyti:**
Bygginevndin viðgjørdi málið á fundi 27. oktober 2011. Ein meiriluti í bygginevndini, Jógvan Arge, Annfinn Brekkstein, Jóan Petur Hentze og Heri Olsen, heitir á mentamálanevndina um at útvega írestandi fíggingina til prosjektering vísandi til, at tilboðini fyri prosjekteringina samanlaggt eru uml. kr. 1.650.000 hægri enn játtaða upphæddin.

Somuleiðis verður mælt til, at umsitingin fær heimild at fara í samráðingar og gera sáttmála við teir í ískoytinum nevndu ráðgevarar.

Jákup Egholm Hansen boðaði frá, at hann er ikki partur av tilmælinum vísandi til, at hann í skrivi til borgarstjóran 7. oktober 2011 hevur biðið um at verða loystur úr bygginevndini.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælunum hjá bygginevndini um at útvega írestandi fíggingina til prosjektering, og at umsitingin fær heimild at fara í samráðingar og gera sáttmála við nevndu ráðgevarar.

**Mentamálanevndin 27. oktober 2011:** Nevndin samtykti at heita á bygginevndina um sum fyrsta stig nú at útvega ummæli/loyvi frá skógfriðingarnevndini til byggiætlanina í Sortudíki at leggja fyri nevndina aftur sum skjótast.

**Ískoyti:**
Kommunan sendi áheitan til skógfriðingarnevndina um viðmerkingar til ætlanina at byggja musikkskúla í Sortudíki. Skógfriðingarnevndin ger í svari vart við, at talan er um óhepna gongd, um opna, grøna lendið millum Norðurlandahúsið og Sundsvegin so við og við verður umskipað til bygt øki. Skógfriðingarnevndin vísir á jaliga týdningin í býarskipanarligum høpi av at varðveita grøna geiran úr Gundadali, um Sortudíki og Ternurygg niðan í Hoydalarnar. Skógfriðingarnevndin mælir kommununi at skipa økið t.d. millum Berjabrekku, Norðara ringveg, Villingardalsvegin og Sundsvegin í serstakari byggisamtykt, áðrenn støða verður tikin til staðseting av nýggjum Musikkskúlabygningi. Skógfriðingarnevndin sendi svarið til yvirfriðingarnevndina.

Eftir samskifti við yvirfriðingarnevndina hevur kommunan sent náttúrúfriðingarnevndini fyri Streymoyar sýslu formliga áheitan um frávik frá § 2, stk. 2 punkt 2) í náttúrufriðingarlógini, har byggjast skal nærri enn 300 m frá teimum viðalundum, ið Føroya viðalundanevnd hevur um hendi. Víst varð í hesum sambandi m.a. á, at sambært góðkendu almennu byggisamtyktini er talan um C2 øki, har aðrar útbyggingar hava verið í sama øki, uttan at viðurskifti, sum hava týdning í mun til náttúrufriðingarlógina, hava verið umrødd í sambandi við hesi byggimálini. Talan er serliga um Norðurlandahúsið og Kringvarpið.

Náttúrufriðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu og Yvirfriðingarnevndin hava nú svarað áheitanini játtandi. Í gerðabók Streymoyar Sýslu Náttúrufriðingarnevnd frá fundi 25. juni 2012 stendur m.a.:

"Nevndin viðgjørdi málið og er samd um at viðmæla umsóknini og at gera frávik frá § 2, stk. 2 nr. 2. Á økinum standa frammanundan Norðurlandahúsið og Kringvarp Føroya, og eru fleiri útbyggingar gjørdar síðan ta upprunaligu byggingina av hesum bygningum.

Mett var tí, at placeringin av einum Musikkskúla á sama øki var ein natúrligur partur av ætlanini hjá Tórshavnar Kommunu, og vil Náttúrufriðingarnevndin fyri Streymoyar Sýslu tí geva sítt loyvi til nevndu bygging.

Nevndin metti heldur ikki, at henda bygging kom at gera nakað inntriv í opna grøna lendið frá Boðanesi um Hoydalar, Ternurygg og niðan til nýggja sambindingarvegin undir Vatnaskørðum, sum Skógfriðingarnevndin vil vera við. Bygningurin kemur ikki at skemma í náttúruni, tvørturímóti er hetta ein sera nútímans og snotiligur bygningur, sum kemur at prýða um í landslagnum."

Á fundi 26. juni 2012 staðfesti Yvirfriðingarnevndin avgerðina hjá Náttúrufriðingar-nevndini fyri Streymoyar Sýslu við tí fyrivarni, at "... der ikke modtages anke inden ankefristens udløb den 24. juli 2012.

Mett verður, at málið og tilmælið, sum varð lagt fyri mentamálanevndina 27. oktober 2011, um at útvega írestandi fíggingina til prosjektering, og at umsitingin fær heimild at fara í

samráðingar og gera sáttmála við omanfyri nevndu ráðgevarar tí kann takast upp aftur til støðutakan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, vísandi til tilmæli til fund í mentamálanevndini 27. oktober 2011, at útvega írestandi fíggingina til prosjektering v.m. og játta kr. 1.715.796,- av kontu 5175 Musikkskúlin (Løgujáttan), og at umsitingin fær heimild at fara í samráðingar og gera sáttmála við nevndu ráðgevar.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012**: Einmælt samtykt.

**Bygginevndin og mentamálanevndin 15. januar 2013:** Skipanaruppskotið framlagt. Heitt verður á ráðgevararnar um at fáa kannað undirlendið og fáa til vega neyvari kostnaðarmeting av planeringini sum skjótast. Bygningurin í skipanaruppskotinum er størri enn í byggiskránni, eins og kostnaðurin hægri. Biðið verður um lýsing av, hvør munurin er.

**Fíggjarnevndin 16. januar 2013:** Útsett.

Nevndarlimur hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013: Útsett.**

**Tekniska nevnd 18. mars 2013: Málið umrøtt.**

**Ískoyti:**
Kontrast hevur latið gera nýggja kostnaðarmeting av handverkaraútreiðslunum. Hildið verður fast við fermetratalið 2.163 í gólvvídd til tess ikki at fáa ov smá undirvísingarhøli. Hinvegin er staðfest ikki neyðugt við sjálvvirkandi brandávaringarskipan (ABA), sum gevur eina sparing uppá kr. 500.000. Aðrar sparingar eru eisini.

Graviroyndirnar hava staðfest ein eykakostnað til grevstur og fyllu uppá kr. 2.500.000 treytað av, at grót verður fingið til vega uttan kostnað. Harumframt er eykakostnaður fyri skifer klæðing kr. 1.800.000.

Handverkaraútreiðslurnar sambært nýggju kostnaðarmetingini eru kr. 42.650.000 íroknað 12% óvist. Hetta skal samanberast við, at kostnaðarmetingin frá 2011 roknaði við kr. 41.800.000. Við eykakostnaðinum fyri grevstur og fyllu og skifer klæðing verða samlaðu handverkaraútreiðslurnar kr. 46.949.040.

Á fundi 11. mars 2013 samtykti bygginevndin at mæla til, at prosjekteringsarbeiðið heldur fram innanfyri karmin í nýggju kostnaðarmetingini uppá kr. 46.949.040.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Samtykt at heita á bygginevndina um sum skjótast at nágreina, við atliti til at byggjast skal fyri í mesta lagi 55 mió. kr.

**Ískoyti:**

Bygginevndin hevur havt fund 3. juni 2013, har tillagað skipanaruppskot dagfest 31. mai 2013 varð viðgjørt.

Við støði í samtyktini hjá mentamálanevndini fingu ráðgevararnir boð um eitt tillagað skipanaruppskot fyri upphædd í mesta lagi kr. 39 mió í handverkaraútreiðslum. Bygginevndin varð síðan gjørd varug við, at handverkaraútreiðslurnar sambært ráðgevaraavtaluni er kr. 41,8 mió.

Bygginevndin hevur um tpost 17.-18 mai 2013 viðgjørt støðuna og avgjørt at biðja um eitt tillagað skipanaruppskot fyri upphæddina samsvarandi ráðgevaraavtaluni kr. 41,8 mió í handverkaraútreiðslum.

Sambært skipanaruppskotinum, har støðið er ein bygging uppá 2.042 bruttofermetrar, verða handverkaraútreiðslurnar kr. 41,6 mió íroknað eyka grevstur og fylling, kravd parkeringspláss og skiferklædning av eternit. Ráðgevin kannar loysn við eternit-skifer nærri.

Gjørd er sparing á leið kr. 700.000 í mun til einari optimalari akustik-loysn. Bygginevndin viðmerkti í hesum sambandi, at ein musikkskúli skal hava optimal ljóðviðurskifti, og at ráðgevin í víðari prosjekteringini tekur hædd fyri hesum.

Bygginevndin samtykti skipanaruppskotið at fara víðari til forprosjektering og at senda mentamálanevndini uppskotið til góðkenningar.

**Mentamálanevndin 5. juni 2013:** Nevndin samtykti at góðkenna skipanaruppskotið.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur á fundi 7. oktober 2013 viðgjørt ymsar spurningar, sum ráðgevararnir og tekniska fyrisitingin hava umrøtt í sambandi við prosjekteringsarbeiðið, og sum hava týdning at fáa avklárað tekniskt og fíggjarliga.

Spurningur er um staðseting av skúlanum á økinum, herundir um skipan av vegatkomu frá Sundsvegnum og parkeringsplássinum eisini við atliti at parkeringsplássinum hjá Norðurlandahúsinum, og yvirflatuvatnviðurskifti, har tað er umráðandi at taka hædd fyri, at stórar nøgdir av vatni fara tvørtur ígjøgnum byggiøkið til skúlan.

Í hesum sambandi verður mett fyrimunur fyri verkætlanina, at ognin matr.nr. 1453b verður keypt og tikin niður. Hetta gevur møguleika at flyta part av skúlanum av ánni og alla bygginginа longur burtur frá Norðurlandahúsinum, og at skipa vegatkomu og parkeringsplássið betri eisini við atliti at dagføringini av Sundsvegnum annars.

Bygginevndin samtykti at beina spurningin um møguleikan, at kommunan ognar sær nevndu ogn og at leggja grundøkið aftrat byggiverkætlanini til Musikkskúlan, til mentamálanevndina at taka støðu til.

**Mentamálanevndin 9. oktober 2013:** Nevndin samtykti at taka málið uppaftur á næsta fundi. Til fundin skal fyriliggja neyv útgreining av avleiðingum og kostnaði v.m., um ognin ikki verður keypt.

**Mentamálanevndin 21. oktober 2013:** Útsett til næsta fund.

**Bygginevndin 31. oktober 2013:** Umsitingin hevur gjørt nýggja kostnaðarmeting grundað á innkomna prosjektuppskotið. Staðfestast kann, at munandi príshækkingar eru í handverkaraútreiðslunum.

Ráðgevin hevur eisini lýst fyrimunir og vansar við atliti til ferðslu, parkering og skipan av økinum. Bygginevndin staðfestir, at ein loysn, har ognin matr. nr. 1453b verður keypt at taka niður, er frá einum fakligum sjónarmiði best fyri samlaðu loysnina.

Av tí at kostnaðurin er omanfyri ásetta fíggjarkarmin, beinir bygginevndin málið í mentamálanevndina at taka støðu til nýggju kostnaðarmetingarnar, hvør loysn til skipan av økinum skal veljast, og til val av tilfari til klædning.

Eisini skal støða takast til, um framhald av prosjekteringini fyribils skal bíða, til politiska viðgerðin av omanfyri standandi er avgreidd.

**Mentamálanevndin 6. november 2013:** Bogi Andreasen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

Jákup Egholm Hansen, tekniski stjórin, gjøgnumgekk nýggju kostnaðarmetingina hjá bygginevndini.

Niðurstøðan varð at málið eigur at fáa eina skjóta politiska viðgerð.

**Mentamálanevndin 10. desember 2013:** Samtykt at mæla býráðnum um fíggjarnevndina til at hækka íløgukarmin til handverkaraútreiðslur til 48,6 mió samsvarandi kostnaðarmeting dagfest 25. oktober 2013 og bjóða arbeiðið út, tá forprosjekt fyriliggur.

**Fíggjarnevndin 11. desember 2013:** Samtykt at hækka íløgukarmin til samanlagt kr. 67,125 mió. (handverkaraútreiðslur í mesta lagi kr. 48,6 mió.) og at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión í fakentreprisu, tá høvuðsprosjekt fyriliggur og at beina málið í býráðið.

**Býráðið fyri læstum hurðum 12. desember 2013:** Einmælt samtykt.

- Nevndarlimur ynskir málið á skrá.

**Mentamálanevndin 6. mars 2014:** Málið varð umrøtt.

Sigrun Mohr var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Málið um staðseting av Musikkskúlanum verður tikið upp til nýggja viðgerð. Víst er á aðrar staðsetingarmøguleikar í Havn enn í Sortudíki, eisini við í størstan mun at brúka verandi prosjekt.

**Mentamálanevndin 22. mai 2014:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson og Bogi Andreasen, heitir á býráðið um at broyta staðsetingina av Musikkskúlanum til Landavegin, matr.nr. 917.

Ein minniluti, Jógvan Arge og Halla Samuelsen, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Atkvøtt varð um broytingaruppskot frá Jógvan Arge, um at býráðið samtykkir at staðfesta ta staðseting, sum býráðið áður hevur samtykt fyri musikkskúlan, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Halla Samuelsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Rúni Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, og Heðin Mortensen

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli í mentamálanevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ráðgevin hevur arbeitt við nýggju staðsetingini av Musikkskúlanum á matr. nr. 917, og við atkomuviðurskiftum og parkering. Uppskot verður lagt fyri nevndina til viðgerðar.

Staðsetingin reisir spurningar um fígging av vegagerðini í samband við bygingina.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Útsett.

**Ískoyti:**
Bygginevndin fyri nýggjum Musikkskúla hevur á fundi 19. juni 2014 viðgjørt uppskot til disponering av grundøkinum, herundir atkomuviðurskifti bæði til sjálvan skúlan og víðari til aðra bygging í økinum seinni (ítróttarhøll og fólkaskúli), parkering og staðseting av sjálvum bygninginum.

Nevndin tekur í høvuðsheitum undir við uppskotinum til staðseting og økisdisponering. Nevndin viðmerkir, at í mun til vegatkomu til bygningin skal tryggjast, at nokk av plássi er til at byggja ítróttahøll á grannastykkinum omanfyri. Í mun til vindviðurskifti varð møguleikin, at snara bygningin nakað, nevndur, ella at hetta verður loyst á annan hátt við teirri staðseting, bygningurin sambært uppskotinum nú hevur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til prinsippiella góðkenning av staðsetingini, atkomu- og parkeringsviðurskiftunum og skipan av økinum annars.

**Tekniska nevnd 23. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Gjørt er uppskot til fyribils vegatkomu frá Landavegnum sum alternativ til endaligu atkomuna frá Hans Andriasar gøtu, sum bygginevndin á undanfarna fundi samtykti, og sum tekniska nevnd hevur samtykt 23. juni 2014. Í hesum liggur, at endaliga vegatkoman til alt økið, har komandi Vesturskúli eisini skal byggjast, er verkætlan fyri seg. Bygginevndin var samd um at gera fyribils atkomuveg til musikkskúlan frá Landavegnum nú, og at endalig vegaføring ikki er við í hesi verkætlan.

**Ferðslunevndin 18. september 2014:** Útsett.

**Ferðslunevndin 26. september 2014:** Uppskotið frá bygginevndini var umrøtt. Mett verður at tað er neyðugt at fáa útvegað ítøkiligari upplýsingar, at leggja fyri nevndina aftur, um virksemið á økinum og hvat tað viðførir av ferðslutrýsti, soleiðis at ein meting kann gerast av ferðslutekniskum loysnum fyri alt økið kring skúladepilin sambært framskrivaðum ferðsluútrokningum.

Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 8. oktober 2014:** Kunnað varð um málið. Málið verður tikið uppaftur á næsta fundi.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevnd 22. oktober 2014:** Borgarstjórin greiddi frá málinum.

**Ferðslunevndin 28. oktober 2014:** Vísandi til væntað økt ferðslutrýst á økinum m.a. við Landavegin, mælir ferðslunevndin til at taka undir við ætlanini hjá bygginevndini fyri musikkskúlan sum eina fyribilsloysn. Nevndin vísir tó á, at ein endalig loysn á ferðsluviðurskiftunum kring musikkskúlan eigur at verða gjørd við atliti til øki til busslummar á Landavegnum, áðrenn miðnámsskúlin í Marknagili verður tikin í nýtslu.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur í samtykt 22. oktober 2014 at mæla mentamálanevndini til at taka uppaftur áður gjørda samtykt um útbjóðingarhátt, so at arbeiðið verður boðið út í høvuðsentreprisu.

**Tilmæli:**
Tekniska fyrisiting mælir til at bjóða arbeiðið út í innbodnaðari høvuðsarbeiðstøku.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við ferðslunevndini.

**Tekniska nevnd 5. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 05. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá teknisku fyrisiting at bjóða arbeiðið út í innbodnaðari høvuðsarbeiðstøku og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 12. november 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsarbeiðstøku og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 20. november 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Bygginevndin fyri nýggjum Musikkskúla hevur á fundi 30. mars 2015 mælt til, at hesir 6 verða bodnir inn til heildararbeiðstøku:

1. Articon
2. J & K Petersen

3. Búsetur
4. Húsavarðatænastan
5. TG-Verk
6. MT Højgaard

og at beina málið í mentamálanevndina.

**Mentamálanevndin 07. april 2015:** Samtykt at taka undir við ískoytinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. maj 2015:** Samykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Bygginevndin fyri nýggjum musikkskúla hevur umbiðið broytt prosjekt til tess at bøta um teir manglar, sum mett var, at upprunaprosjektið hevði í mun til orkesturhølið, umsiting v.m.

Ráðgevin hevur latið gera uppskot til broytt prosjekt, har orkesturhølið er vaksið við 226 bruttofermetrum og høvuðsbygningurin við 210 bruttofermetrum, samlað øking 436 bruttofermetrar. Sambært uppskotinum er samlaða byggingin 2.599 bruttofermetrar.

Orkesturhølið er víðkað og broytt, so at pallplássið er 9x18 m umframt aðrar backstage hentleikar. Orkesturhølið rúmar nú uml. 348 áhoyrarum.

Tidnan í høvuðsbygningingum er gjørd størri, somuleiðis skarðið. Hetta gevur størri høli til umsiting og lærarar á báðum hæddum og omaná tidnuni, rúmligari inngongdir og foyer. Eisini goymslurnar gerast fleiri.

Sambært kostnaðarmeting verða HVÚ kr. XX mió.

Bygginevndin hevur á fundi 9. mars 2016 samtykt at bjóða dagførda projektið út í høvuðsarbeiðstøku og at hækka íløgukarmin fyri HVÚ til kr. XX mió.

**Mentamálanevndin 16. mars 2016:** Samtykt at taka undir við bygginevndini og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur fyri læstum hurðum 17. mars 2016:** Einmælt samtykt

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Kunna varð um, at býráðið fyri læstum hurðum einmælt hevði samtykt at bjóða projekti út í høvuðsarbeiðstøku við ásettum íløgukarmi.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Málið um staðseting av Musikkskúlanum verður tikið upp til nýggja viðgerð. Víst er á aðrar staðsetingarmøguleikar í Havn enn í Sortudíki, eisini við í størstan mun at brúka verandi prosjekt.

**Mentamálanevndin 22. mai 2014:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson og Bogi Andreasen, heitir á býráðið um at broyta staðsetingina av Musikkskúlanum til Landavegin, matr.nr. 917.

Ein minniluti, Jógvan Arge og Halla Samuelsen, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Atkvøtt varð um broytingaruppskot frá Jógvan Arge, um at býráðið samtykkir at staðfesta ta staðseting, sum býráðið áður hevur samtykt fyri musikkskúlan, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Halla Samuelsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Rúni Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, og Heðin Mortensen

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli í mentamálanevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ráðgevin hevur arbeitt við nýggju staðsetingini av Musikkskúlanum á matr. nr. 917, og við atkomuviðurskiftum og parkering. Uppskot verður lagt fyri nevndina til viðgerðar.

Staðsetingin reisir spurningar um fígging av vegagerðini í samband við byggingina.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Útsett.

**Ískoyti:**
Bygginevndin fyri nýggjum Musikkskúla hevur á fundi 19. juni 2014 viðgjørt uppskot til disponering av grundøkinum, herundir atkomuviðurskifti bæði til sjálvan skúlan og víðari til aðra bygging í økinum seinni (ítróttarhøll og fólkaskúli), parkering og staðseting av sjálvum bygninginum.

Nevndin tekur í høvuðsheitum undir við uppskotinum til staðseting og økisdisponering. Nevndin viðmerkir, at í mun til vegatkomu til bygningin skal tryggjast, at nokk av plássi er til at byggja ítróttahøll á grannastykkinum omanfyri. Í mun til vindviðurskifti varð møguleikin, at snara bygningin nakað, nevndur, ella at hetta verður loyst á annan hátt við teirri staðseting, bygningurin sambært uppskotinum nú hevur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til prinsippiella góðkenning av staðsetingini, atkomu- og parkeringsviðurskiftunum og skipan av økinum annars.

**Tekniska nevnd 23. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Gjørt er uppskot til fyribils vegatkomu frá Landavegnum sum alternativ til endaligu atkomuna frá Hans Andriasar gøtu, sum bygginevndin á undanfarna fundi samtykti, og sum tekniska nevnd hevur samtykt 23. juni 2014. Í hesum liggur, at endaliga vegatkoman til alt økið, har komandi Vesturskúli eisini skal byggjast, er verkætlan fyri seg. Bygginevndin var samd um at gera fyribils atkomuveg til musikkskúlan frá Landavegnum nú, og at endalig vegaføring ikki er við í hesi verkætlan.

**Ferðslunevndin 18. september 2014:** Útsett.

**Ferðslunevndin 26. september 2014:** Uppskotið frá bygginevndini var umrøtt. Mett verður at tað er neyðugt at fáa útvegað ítøkiligari upplýsingar, at leggja fyri nevndina aftur, um virksemið á økinum og hvat tað viðførir av ferðslutrýsti, soleiðis at ein meting kann gerast av ferðslutekniskum loysnum fyri alt økið kring skúladepilin sambært framskrivaðum ferðsluútrokningum.

Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 8. oktober 2014:** Kunnað varð um málið. Málið verður tikið uppaftur á næsta fundi.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevnd 22. oktober 2014:** Borgarstjórin greiddi frá málinum.

**Ferðslunevndin 28. oktober 2014:** Vísandi til væntað økt ferðslutrýst á økinum m.a. við Landavegin, mælir ferðslunevndin til at taka undir við ætlanini hjá bygginevndini fyri musikkskúlan sum eina fyribilsloysn. Nevndin vísir tó á, at ein endalig loysn á ferðsluviðurskiftunum kring musikkskúlan eigur at verða gjørd við atliti til øki til busslummar á Landavegnum, áðrenn miðnámsskúlin í Marknagili verður tikin í nýtslu.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur í samtykt 22. oktober 2014 at mæla mentamálanevndini til at taka uppaftur áður gjørda samtykt um útbjóðingarhátt, so at arbeiðið verður boðið út í høvuðsentreprisu.

**Tilmæli:**
Tekniska fyrisiting mælir til at bjóða arbeiðið út í innbodnaðari høvuðsarbeiðstøku.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við ferðslunevndini.

**Tekniska nevnd 5. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 05. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá teknisku fyrisiting at bjóða arbeiðið út í innbodnaðari høvuðsarbeiðstøku og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 12. november 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsarbeiðstøku og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 20. november 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Bygginevndin fyri nýggjum Musikkskúla hevur á fundi 30. mars 2015 mælt til, at hesir 6 verða bodnir inn til heildararbeiðstøku:

7. Articon
8. J & K Petersen
9. Búsetur
10. Húsavarðatænastan
11. TG-Verk
12. MT Højgaard

og at beina málið í mentamálanevndina.

**Mentamálanevndin 07. april 2015:** Samtykt at taka undir við ískoytinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. maj 2015:** Samykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Bygginevndin fyri nýggjum musikkskúla hevur umbiðið broytt prosjekt til tess at bøta um teir manglar, sum mett var, at upprunaprosjektið hevði í mun til orkesturhølið, umsiting v.m.

Ráðgevin hevur latið gera uppskot til broytt prosjekt, har orkesturhølið er vaksið við 226 bruttofermetrum og høvuðsbygningurin við 210 bruttofermetrum, samlað øking 436 bruttofermetrar. Sambært uppskotinum er samlaða byggingin 2.599 bruttofermetrar.

Orkesturhølið er víðkað og broytt, so at pallplássið er 9x18 m umframt aðrar backstage hentleikar. Orkesturhølið rúmar nú uml. 348 áhoyrarum.

Tidnan í høvuðsbygningingum er gjørd størri, somuleiðis skarðið. Hetta gevur størri høli til umsiting og lærarar á báðum hæddum og omaná tidnuni, rúmligari inngongdir og foyer. Eisini goymslurnar gerast fleiri.

Sambært kostnaðarmeting verða HVÚ kr. XX mió.

Bygginevndin hevur á fundi 9. mars 2016 samtykt at bjóða dagførda projektið út í høvuðsarbeiðstøku og at hækka íløgukarmin fyri HVÚ til kr. XX mió.

**Mentamálanevndin 16. mars 2016:** Samtykt at taka undir við bygginevndini og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Ískoyti:**
**Útbjóðing av Musikkskúlanum.**

Annfinn Brekkstein bað um at fáa málið á skrá við atliti til at loyva fyritøkuni Sp/f Eysturlon at luttaka í sambandi við, at ætlanin er at bjóða arbeiðið at byggja Musikkskúlan út.

**Býráðsfundur 23. august 2016:** Samtykt at taka undir við, at Sp/f Eysturlon kann bjóða upp á arbeiðið at byggja Musikkskúlan, treytað av, at umsitingin metir fyritøkuna vera føra fyri átaka sær arbeiðið.

**Ískoyti**
Samtyktar játtanir inn á løgujáttanina L51002 í alt síðan 2009 eru kr. 6.216.000. Bókað nýtsla hesi árini pr. ultimo oktober 2016 er kr. 7.535.661, ið gevur eina meirnýtslu uppá kr. 1.334.830. Harumframt skal roknast projektumsiting kr. 40.000, samlað kr. 1.374.830. Meirnýtslan verður at fíggja av løgukarminum 5175 Musikkskúlin, har játtan er tøk.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1.400.000 av løgukarminum 5175 Musikkskúlin til løgukontu L51002 Musikkskúlin útvegan av hølum.

**Mentamálanevndin 24. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina

**Fíggjarnevndin 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Hin 25. november 2016 var lisitatión fyri byggingini av nýggjum musikkskúla. Sjey fyritøkur vórðu bodnar at bjóða, og inn komu fimm tilboð. Úrslitið av lisitatiónini var hetta:

| | |
|---|---|
| Húsavarðatænastan | kr. 63.881.746,54 |
| MT Højgaard | kr. 68.412.026 |
| Búsetur | kr. 69.902.472 |
| TG Verk | kr. 72.999.193 |
| J&K Petersen/Eysturlon | kr. 76.898.007 |

Kostnaðarmetingin ljóðaði uppá kr. 60.000.000. Talan er um handverkaraútreiðslur (HVÚ).

Kontrast og ráðgevaratoymið hava eftirmett tilboðini. Øll tilboð lúka útboðstreytirnar. Niðurstøðan er, at samanumtikið fyri øll fak er tilboðið hjá Húsavarðatænastuni, sum hevði lægsta tilboð, sera gott. Mælt verður til, at sáttmálasamráðingar verða við Húsavarðatænastuna.

Byggitíðarskeiðið er ætlandi 21 mðr.

Bygginevndin hevur á fundi 5. desember 2016 einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá ráðgevanum og at beina málið í mentamálanevndina.

Fyrisitingin viðmerkir, at fígging til at byggja musikkskúlan er ikki tøk í íløgujáttanini. Mett verður, at til ber ikki at fara í ítøkiligar sáttmálasamráðingar um arbeiðstøku á hesum

grundarlagi. Kannað eigur at verða, um lægsti tilboðsgevi Húsavarðatænatan vil standa við tilboðið til fíggingin er avklárað.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at útvega samlaða fígging til byggiverkætlanina fyrst, áðrenn farið verður undir sáttmálasamráðingar við lægsta tilboðsgeva Húsavarðatænastan.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Nevndin samtykti at fara undir sáttmálasamráðingar við lægsta tilboðsgevaran og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at fara undir sáttmálasamráðingar við lægsta tilboðsgevaran, og samstundis vísir fíggjarnevndin á samtyktina um meirinntøkur í sambandi við figgjarætlanina 2017.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Boga Andreasen, um at útvega samlaða fígging til byggiverkætlanina fyrst, áðrenn farið verður undir sáttmálasamráðingar við lægsta tilboðsgeva Húsavarðatænastan, ið fall við einari atkvøðu fyri og og 9 ímóti.

Fyri atkvøddi:
Bogi Andreasen.

Ímóti atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein og Jógvan Arge.

Greiddu ikki atkvøðu:
Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Síðan varð atkvøtt tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð einmæltsamtykt.

## 326/16 Áheitan vegna kirkjuráðið á Argjum um fund um ymiskar fyrispurningar í sambandi við byggjan av nýggjar kirkju á Argjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 406/16 | 16/02717-6 |
| 2 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 326/16 | 16/02717-6 |

**Málslýsing:**
Kirkjuráðið á Argjum upplýsir í skrivi dagf. 1. september 2016, at kirkjuráðið er komið so mikið væl áleiðis við fyrireikingunum at byggja nýggja kirkju á Argjum, at greiða skal fáast á teimum fíggjarligu viðurskiftunum. Í hesum sambandi heitir kirkjuráðið á Tórshavnar kommunu um at vera við í hesi tilgongd.
Víst verður á møguleikan, at kommunan keypir verandi bygning, matr. nr. 99a og grundøki 99b, tilsamans virðismett til 4,9 mió. Harumframt, at kommunan letur fígging til framsíður og tekju av Rheinzink, mett til kr. 5 mió, og at kommunan fíggjar ella yvirtekur arbeiðið við uttanumøkinum, mett til kr. 4 mió.
Í seinni skrivi vísir kirkjuráðið á, at aðrar kirkjur hava fingið slíka fígging frá kommununi, nevnt verður Vesturkirkjan, Havnar kirkja og Hoyvíkar kirkja.
Fyrisitingin metir, at til ber hjá kirkjuráðnum at selja verandi bygning í fríari sølu fyri prís, ið samsvar við virðismetingina.
Í sambandi við byggingina av Hoyvíkar kirkju, játtaði kommunan fígging til uttanumøki og byggilistarligu útsjóndina, sum var kopartekjan.
Mett verður, at í fyrsta umfarið eigur kommunan at taka støðu til, hvørt kommunan vil taka lut í byggigini, hvat listarligu útsjóndini viðvíkur, tað er Rheinzinkið, sum mett er til kr. 5 mió.
Spurningur um fígging til útiøkið kann takast upp aftur seinni, tá byggingin er komin longri áleiðis, evt. sum partur av fríðkan av býnum.
Verður fígging latin, verður mett, at henda kann latast av kontu 5370 stuðul til íløgur, sum mentamálanevndin hevur um hendi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til, at tilsøgn verður latin kirkjuráðnum á Argjum um íløgufígging av kontu 5370 stuðul til íløgur í mesta lagi kr. 5 mió til byggilistarligu útsjóndina, tað er framsíður og tekja av Rheinzinki, at rinda út, tá arbeiðið er gjørt. Kirkjuráðið skal í hesum sambandi upplýsa, hvat ítøkiligi kostnaðurin av hesum verður, og nær útreiðslan væntast at falla.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Samtykt uttan atvkøðugreiðslu at beina málið í mentamálanevndina.

# 327/16 Trivnaðarnevndin: Umbøn frá eldraráðum um broyting av viðtøkunum, soleiðis at heimild verður fyri at útgjalda fundarpening e.l.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 26.09.2016 | 41/16 | 16/01243-4 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 28.11.2016 | 57/16 | 16/01243-4 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 06.12.2016 | 61/16 | 16/01243-4 |
| 4 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 408/16 | 16/01243-4 |
| 5 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 327/16 | 16/01243-4 |

**Málslýsing:**
Eldraráðið hevur í telduposti dagfest 26. aug. 2016 sent umsókn um broyting í § 6, stk. 4 í viðtøkunum fyri Eldraráðið:

§ 6, stk. 4 er soljóðandi: Tað er sjálvboðið at vera limur í Eldraráðnum. Samsýning verður ikki latin, men limirnir kunnu fáa endurgjald fyri skjalprógvaðar útreiðslur til ferðing til og frá fundum í Eldraráðnum.

Eldraráðið heitir á Tórshavnar Býráð um at endurskoða, tillaga og dagføra viðtøkurnar fyri Eldraráðið soleiðis, at tað verður gjørligt at veita ráðslimunum eina ella aðra samsýning fyri tað eykaarbeiði, tað er at sita í Eldraráðnum í eitt 4-ára skeið.

Sambært Eldraráðnum er vanligt, at ráðs- og nevndarlimir fáa eina ella aðra samsýning fyri sítt nevndararbeiði. Í tí liggur ein viðurkenning av og virðing fyri tí arbeiði, ráðs- og nevndarlimir gera. Sagt verður víðari, at limirnir í teimum báðum føroysku eldraráðunum munnu vera millum tey einastu, ið ikki verða samsýntir á nakran hátt.

Valbærisaldurin er 60 ár, og metir ráðið, at tað kann vera torført at fáa fólk í arbeiðsførum aldri at lata seg velja í ráðið.

Eldraráðið vísir til viðtøkurnar fyri eldraráðið í Keypmannahavn § 7, stk. sum grundarlag fyri ynsktu broytingini soleiðis, at ráðslimirnir kunnu fáa samsýning.

Har stendur m.a., at "Borgerrepræsentationen yder diæter, erstatning for dokumenteret arbejdsfortjeneste og udgiftsgodtgørelse efter reglerne i § 16 a i lov om kommunernes styrelse til Ældrerådets medlemmer. Ældrerådets
medlemmer kan modtage diæter for deltagelse i ældrerådsmøder, i forretningsudvalgsmøder og i Ældrerådets fagudvalgsmøder. Borgerrepræsentationin fastsætter årligt med vedtagelsen af komunens budget det beløb, som maksimalt må udbetales til diæter m.v. i henhold til § 16 a i lov om kommunernes styrelse."

Omanfyri nevnda § 16 a í donsku kommunustjórnarlógini er soljóðandi: Der ydes et fast vederlag til kommunalbestyrelsens medlemmer. Økonomi- og indenrigsministeren fastsætter nærmere regler om vedarlaget. Vederlaget omfatter medlemmernes a) deltagels i møder i kommunalbestyrelsen og dennes udvalg samt underudvalg,..."

Danska lógin um rættartrygd (Retssikkerhedsloven) § 31, stk 3 er soljóðandi:
"Kommunalbestyrelsen yder diæter, erstatning for dokumenteret tabt arbejdsfortjeneste og

udgiftsgodtgørelse efter reglerne i § 16 a i lov om kommunernes styrelse til ædrerådets medlemmer."

Danska Velfærdsministeriet hevur í 2008 svarað fyrispurningi viðvíkjandi tulking av reglunum um diæter (allýsing: endurgjald latið sum skattafrí samsýning, ið skal dekka útreiðslur til kost, logi v.m., um ein er burtur frá arbeiði ella ferðast longri enn 4 tímar) í mun til limir í eldraráði vísandi til, at ráðið verður fatað sum "underudvalg" sambært omanfyri nevndu § 16 a.

Eitt nú vísandi til donsku lógina um rættartrygd omanfyri er niðurstøðan, at "I de tilfælde, hvor kommunalbestyrelsen har godkendt vedtægter for ældrerådet, hvoraf det fremgår, at ældrerådet organiseres i specifikke underudvalg, arbejdsgrupper mv., skal ældrerådsmedlemmerne have diæter mv. i forbindelse med møder i disse.
Ældrerådsmedlemmer er ikke berettigede til at modtage diæter for frivillig deltagelse i konferencer, kurser m.v.
Det afgørende for, om ældrerådsmedlemmers arbejde i underudvalg, deltagelse i konferencer o.a. berettiger til diæter, er således, hvorvidt aktiviteterne indgår som en del af den arbejdsfordeling for ældrerådets virke, som er pålagt og godkendt af kommunalbestyrelsen."

Hetta er í samsvari við verandi viðtøkur fyri eldraráðið hjá Tórshavnar kommunu. Tað er tí skeiv fatan, at limir í donskum eldraráðum fáa fundarpengar ella aðra samsýning útyvir skjalprógvaðar útreiðslur.

Eldraráðið hevur fund tvær ferðir um mánaðin, 5 limir eru í eldraráðnum. Er fundarvirksemi 10 mánaðir um árið, eru 20 fundir. Um eldraráðið skal vera fevnt av reglunum um fundarsamsýning (kr. 540 fyri fundir undir 3 tímar), so kemur hetta við støði í 20 fundum um árið at kosta kr. 54.000 samlað fyri allar limirnar, hetta svarar til 27% av játtanini til ráðið uppá kr. 200.000. Tað kunnu vera fleiri fundir og luttøkur á ráðstevnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til ikki at broyta viðtøkurnar í § 6, stk. 4.

**Trivnaðarnevndin 26. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Harumframt samtykt at taka viðtøkurnar upp til endurskoðan.

**Ískoyti:**
Forkvinnan ynskir málið á skrá.

**Trivnaðarnevndin 28. november 2016:** Samtykt at gera uppskot til viðtøkubroyting í § 6 við tí endamáli, at eldraráðslimunum verður veitt fundarsamsýning.

**Ískoyti:**
Við støði í omanfyri standandi samtykt er uppskot, at eldraráðnum verður veitt mánaðarlig samsýning svarandi til tað til eina og hvørja tíð galdandi gjald fyri fund undir 3 tímar, t.e. kr. 552. Um árið er talan um kr. 6.624 fyri hvønn eldraráðslimin. Fyri allar fimm eldrarráðslimirnar verður samlaði kostnaðurin fyri 12 mðr. kr. 33.120. Tað er konta 1315 ráð og nevndir, sum ber kostnaðin av virksemi eldraráðsins.

Ásetingarnar í § 6, stk. 4 í viðtøkunum fyri eldraráðið kunnu tí broytast til soljóðandi:

"Til limirnar í Eldraráðnum verður veitt mánaðarlig samsýning svarandi til tað til eina og hvørja tíð galdandi gjald fyri fund undir 3 tímar. Limirnir kunnu fáa endurgjald fyri skjalprógvaðar útreiðslur til ferðing til og frá fundum í Eldraráðnum".

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at taka undir við uppskotinum til viðtøkubroyting.

**Trivnaðarnevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

# 328/16 Talgild plássávísingarskipan til dagstovnaøkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.10.2015 | 187/15 | 15/03760-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 13.01.2016 | 18/16 | 15/03760-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 30.11.2016 | 301/16 | 15/03760-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 401/16 | 15/03760-1 |
| 5 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 328/16 | 15/03760-1 |

**Málslýsing:**
Mentamálanevndin hevur á fundi 14. januar 2015 tikið undir við tilmæli um at fáa til vega nýggja KT-skipan til plássávísingina (mál 14/01148).

Í uppriti til tann fundin er greitt frá, at í dag finnast útlendskar KT-skipanir, har foreldur sjálvi bíleggja stovnspláss og taka av stovnsplássi alt um digitalan platform. Eisini ber til at skriva seg upp á ynskilista til eitt ávíst pláss, siga upp pláss, søkja um farloyvi v.m. Har ber altíð til at fáa dagført yvirlit yvir, um ella nær pláss er tøkt á stovnunum.

Skipanin kann eisini sjálv vísa foreldrum á tøk pláss í nærumhvørvinum og sjálvvirkandi geva foreldrum boð, um broytingar henda.

Ikki bert er hetta ein betri tænasta til foreldrini. Hetta er eisini gjøgnumskygt og lættir um hjá umsitingini. Uppgávan hjá kommununi verður at vegleiða foreldur í at nýta skipanina og tryggja at kommunan á skynsamasta hátt nøktar ansingartørvin í framtíðini. Eisini í mun til støðugt at hava nøktandi yvirlit yvir plásstørvin og veita foreldrum plásstrygd, kann skipanin verða gagnlig.

Tá varð eisini víst á, at neyðugt er at kanna, um til ber at tillaga longu kendar KT-skipanir til okkara viðurskifti, alternativt at menna eina skipan sjálvi.

Til tess er neyðugt at skipa eina verkætlanartilgongd at gera nágreiniliga tørvslýsing sum grundarlag fyri at bjóða út slíka skipan, hvørt tað er at menna eina av nýggjum, ella at keypa og tillaga eina virkandi skipan.

Partur av uppgávuni verður at eftirhyggja allar tær treytir, sum í dag eru í upptøkureglunum til tess at gera skipanina so smidliga sum til ber bæði fyri foreldrini, umsitingina og stovnarnar. Harumframt eisini, hvørjar skipanir og modul skulu ella kunnu knýtast uppí við fyrimuni, herundir fólkayvirlit, faktureringar, hagtøl v.m.

Skipast skal ein verkætlanarbólkur við umboðum fyri avvarðandi deildir (barna- og ungdómsdeildin, snarskivan, kt-deildin, evt. aðrar eftir tørvi), sum saman við verkætlanarleiðara ger uppskot til tørvslýsing at leggja fyri nevnd aftur. Partur av hesum arbeiði verður tí eisini at gera uppskot til broytingar í verandi upptøkureglum og møguliga øðrum mannagongdum, sum hava týdning í mun til ætlaðu endamálini við skipanini.

Mett verður neyðugt at keypa ráðgeving til tilgongd at fáa tørvslýsing og útboðstilfar tilvega. Mett verður, at hetta tekur 3-4 mðr at gera. Kostnaður fyri hetta arbeiðið er mett til kr. 200.000.

Fígging kr. 200.000 kann fáast til vega av ónýttari játtan á 3210 Hjálp vegna vantandi barnaansing.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at fáa til vega tørvslýsing og útboðstilfar til talgilda plássávísingarskipan og til tess at játta kr. 200.000 av kontu 3210 Hjálp vegna vantandi barnaansing ætlað ráðgeving v.m.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Verkætlanarleiðari er settur og arbeiðsbólkur við umboðum fyri snarskivuna, barna- og ungdómsdeildina, fíggjardeildina og dagstovnaleiðarar umboðandi hvørt upptøkuøkið er skipaður.

Ætlan er løgd fyri arbeiðinum, fundir við áhugapartar v.m. Yvirskipað er endamál við talgildu plássávísingarskipanini eitt størri frælsi og betri tænasta til borgaran, sum skjótt kann velja stovnspláss, minni umsiting og neyvari forsagnir um tørv á plássum.

Sambært tíðarætlanini skal tørvslýsing og útbjóðingartilfar verða liðugt 21. apríl 2016.

Umframt hetta er tørvur á einum stýrisbólki við politiskari umboðan at viðgera yvirskipaðar spurningar viðvíkjandi krøvunum til skipanina, herundir broytingar í upptøkureglunum.

Skotið verður upp, at trivnaðarstjórin og miðfyrisitingarstjórin eru umboðaði í stýrisbólkinum aftrat 2-3 politiskum umboðum úr mentamálanevndini. Mett verður, at talan verður um 3-4 fundir í hesum tíðarskeiðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildina mæla mentamálanevndini til at velja politisk umboð í stýrisbólkin.

**Mentamálanevndin 13. januar 2016:** Vald vóru Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson og Jógvan Arge í stýrisbólkin.

**Ískoyti:**

Projektbólkurin hevur latið stýrisbólkinum kravfestingina til nýggja barnaansingarskipan.
Í stýrisbólkinum vóru Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson og Jógvan Arge, trivnarstjórin, miðfyrisitingarstjórin og deildarleiðarin á kt-deildini.

Síðani eru 'Upptøkureglur til dagstovnar í Tórshavnar kommunu' endurskoðaðar, har trivnaðarstjórin, miðfyrisitingarstjórin og leiðarin fyri barna-og ungdómsdeildina umframt onnur hava luttkið í arbeiðinum. Í hesum sambandi er gjørt uppskot til meginreglur, har veitt verður plásstrygd, og sum í størri mun er fleksibul í mun til foreldratørv. Sí hjálagt skjal.

Við talgildari skipan kunnu foreldur bóka pláss talgilt og síggja beinanvegin á hvørjum stovni barnið fær pláss. Somuleiðis fáa foreldur svar frá Tórshavnar kommunu beinanvegin, tá ið plássið er bókað í mun til nú, har foreldur fáa svar frá kommununi, tá ið kommunan hevur útlutað plássini. Mett verður somuleiðis, at skipanin gevur gjøgnumskygni í sambandi við at fáa barnaansingarpláss - bæði fyri borgaran og Tórshavnar kommunu - og skynsamari rakstur hjá Tórshavnar kommunu.

Mett verður, at tekur mentamálanevndin undir við meginreglunum fyri plássávising, so er saman við kravspesifikatiónini klárt at bjóða talgildu plássávísingarskipanina út.

Gerast skal vart við, at játtan til endamálið er ikki sett av á fíggjarætlanini fyri 2017.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, miðfyrisitingarstjórin og leiðarin á barna-og ungdómsdeildini mæla til at taka undir við uppskotinum til broytingar í ‘Upptøkureglur til dagstovnar í Tórshavnar kommunu’ og við støði í hesum og kravspesifikatiónini at bjóða út talgildu plássávísingarskipanina. Harumframt verður mælt til, at játtan verður fingin til vega.

**Mentamálanevndin 30. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við prinsippinum í uppskotinum til broytingar í «Upptøkureglur til dagstovnar í Tórshavnar kommunu» og at bjóða út talgildu plássansingarskipanina, og verður málið at leggja fyri aftur fíggjarnevndina.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>15. desember 2016 | Blað nr.: 13700<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## 329/16 Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 83/15 | 15/01400-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 148/16 | 15/01400-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 225/16 | 15/01400-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 174/16 | 15/01400-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 70/16 | 15/01400-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 14.06.2016 | 179/16 | 15/01400-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.06.2016 | 46/16 | 15/01400-1 |
| 8 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 163/16 | 15/01400-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 314/16 | 15/01400-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 402/16 | 15/01400-1 |
| 11 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 329/16 | 15/01400-1 |

### Málslýsing:

Til tess skjótt at fáa gongd á at betra umstøðurnar til almenna svimjing og kappingarsvimjing í høvuðsstaðarøkinum, verður bygginevndin til 50 m svimjihyl tikin av, og í staðin verður serstøk nevnd við tilvísing til fíggjarnevndina sett at gera allar neyðugar fyrireikingar til bygging av svimjihøll, herundir at:

- Gera neyva tørvslýsing av nýggjari svimjihøll til almenna svimjing og kappingarsvimjing, herundir lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum
- Gera uppskot til staðseting av nýggjari høll
- Gera byggiskrá til verkætlan, herundir hølistørv, teknisk krøv og orkukrøv
- Gera kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri bygging
- Gera rakstrarætlan, t.e. roknað meting um árligar rakstrarkostnaðir
- Gera uppskot til fígging, herundir møguleikar at fáa til vega fígging frá uttanhýsis pørtum

Serstaka nevndin fyri bygging av svimjihøll verður mannað við politiskum umboðum og umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting. Fíggjarnevndin setir nevndina, sum í minsta lagi 2. hvønn mánaða leggur statusfrágreiðing fyri mentamálanevndina og fíggjarnevndina, ið skal góðkenna arbeiðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at seta serstaka nevnd undir fíggjarnevndini at fyrireika nýggja svimjihøll við omanfyristandandi arbeiðssetningi og at velja Elin Lindenskov og Annfinn Brekkstein í nevndina.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 23. mai 2016 samtykt byggiskrá fyri byggiverkætlanina. Byggiskráin er hjáløgd sum fylgiskjal 1 og svarar hon uppá settu spurningarnar og punktini.

Tó viðv. spurninginum um lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum, er at viðmerkja:

Tórshavnar kommuna hevur fylgjandi svimjihallir:
1). Svimjihøllin í Kollafjarðar skúla.
Verður brúkt bæði til skúlar og stovnar og er opin fyri almenninginum fleiri dagar um vikuna og alt skúlaárið. Høllin tænir einum lokalum endamáli burturav og er ikki upplagt at broyta nakað tí viðvíkjandi. Høllin er í góðum standi.

2). Svimjihøllin í eindini á Argjavegi hjá Skúlanum á Fløtum (gl. Argja Skúla). Verður brúkt burturav til skúlabrúks. Framtíðin er nógv tengd at, hvussu verður við eindini á Argjavegi tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020. Uppskotini, ið hava verið nevnd eru til annað kommunalt endamál, so sum innan eldraøkið og hevur Nám X eisini verið nevnt, tó so at í løtuni verður arbeitt út frá, at Nám X fer inn í Handilsskúlabygningin. Alt eftir hvat framtíðar endamálið verður, skal støða takast til, um hylurin framhaldandi skal verða í brúki, ella hølið verður brúkt til annað endamál. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin. Høllin er í góðum standi.

3). Svimjihøllin í Hesti. Verður vanliga brúkt summarmánaðirnar. Ikki nøkur ætlan fyribils um nakra broyting. Høllin er í hampiligum standi.

4). Svimjihøllin í Eystursskúlanum. Hylurin verður brúktur til skúlabrúks umframt til kvøldskúla og aðra undirvísing. Mælt verður til at halda fram við honum óbroytt. Er serliga áhugaverd til ymiskar sertørvir, umframt skúlabrúks. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin, ið annars er í góðum standi.

5). Svimjihøllin í Gundadali. Er nógv brúkt til alskyns endamál.

Undangóðkenning av ráðgevaratoymum
Umsitingin er í holt við at fyrireika undangóðkenning av ráðgevaratoymum til eina møguliga hugskotskapping, sum ætlandi fer í gongd um miðjan juni og gongur fram til oktober.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja
byggiskránna og at beina málið í býráðið, umvegis byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Útsett.

**Ískoyti**
Sbrt. Býráðssamtykt 23. apríl 2015 er talan um eina serstaka nevnd, sum vísir til fíggjarnevndina. Av teirri orsøk verður viðgerðin av byggiskránni at byrja í fíggjarnevndini, sum so beinir málið víðari til aðrar nevndir, áðrenn endaliga viðgerð í fíggjarnevndini og

hareftir býráðsviðgerð.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at samtykkja byggiskránna og at beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni og beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, teknisku nevnd, byggi- og býarskipanarnevndina og heilsu- og umhvørvisnevndina.

**Tekniska nevnd 13. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri langhyl í Gundadal var útskrivað í august 2016, eftir at Tórshavnar býráð 16. juni 2016 hevði samtykt byggiskránna fyri langhyl í Gundadali.

Trý ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey eru:
- Toymið Ósbjørn Jacobsen Ark.
- Toymið SNA Ark.
- Toymið Árni Winther Ark.

23. november 2016 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og vóru tey latin navnloynt soleiðis, at dómsnevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

2. desember 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat uppskot skal vinna hugkappingina og fáa møguleika at innganga møguliga avtalu um projektering vm. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

Hetta mál er tengt at máli 16/01715 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm., ið eisini er til viðgerðar í løtuni.

Á løgukonto 5775 L5610 eru umleið 7.000 tkr. tøkar til verkætlanina. Ætlanin er í næstum at fara undir nærri greiningar og samráðingar við vinnandi hugskotið og koma aftur til nevndarviðgerð við nærri greining av heildarkostnaði, tíðarætlan, útboðsleisti og fíggjarætlan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, mentamálaleiðari og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini um vinnandi hugskotið og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um møguliga projektering, umframt gerð av tíðarætlan, útboðsleisti,

fíggjarætlan vm. og venda aftur til nevndina við einum uppskoti. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

# 330/16 Verkætlan - Tørvur og strategi - bústaðarmøguleikar til eldri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 30.11.2015 | 40/15 | 15/04601-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 07.03.2016 | 11/16 | 15/04601-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 103/16 | 15/04601-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 74/16 | 15/04601-1 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 06.12.2016 | 60/16 | 15/04601-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 407/16 | 15/04601-1 |
| 7 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 330/16 | 15/04601-1 |

**Málslýsing:**
Sum liður í umrøðuni, ið trivnaðarnevndin hevur havt av tørvinum á bústøðum, sum lagaðir eru til umstøðurnar hjá teim eldru, hetta samsvarandi eldrapolitikkinum, er í fíggjarætlanini verkætlanarjáttan kr. 1 mió sett av.

Sum fyrsta stig verður mett neyðugt at skipa eina verkætlan, sum lýsir tørv og møguleikar sum grundarlag fyri at gera langtíðarstrategi til tess at útvega hóskandi íbúðir og røktarbúpláss annars.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til umrøðu av arbeiðssetningi og skipan av verkætlan.

**Trivnaðarnevndin 30. november 2015:** Samtykt at heita á umsitingina um uppskot til arbeiðssetning og verkætlan til næsta fund.

**Ískoyti:**
Endamálið við verkætlanini er at fáa til vega haldgott grundarlag fyri langtíðarstrategi og politiskum raðfestingum til tess at útvega hóskandi mongd av eldrabústaðum, tað veri seg íbúðir, ið eru lagaðar til umstøðurnar hjá teim eldri við tí máli, at tað er betri møguligt at búgva heima sum longst (t.d. vardar leiguíbúðir við atknýttari heimatænastu), og røktarbúpláss.

Strategiin skal taka støði í demografisku broytingunum komandi 30 árini. Atlit skal eisini takast til mál um at tálma kommunala íløgu- og rakstrarkostnaðartørvin til bústaðir og røktartænastur.

Partur av íløgutørvinum er at nútíðargera ella endurútvega verandi ótíðarhóskandi búpláss. Annar partur er at útvega nýggj búpláss samsvarandi metta tørvinum framyvir bæði í mun til røktarbúpláss, demens, umlætting, rehabilitering v.m.

Viðvíkjandi alternativum bústøðum til eldri, tað veri seg vardar leiguíbúðir við atknýti til heimatænastu ella røktarheim, eldraíbúðardeplar e.líkn., er eisini spurningur, hvør kommunali leikluturin í mun til fígging at byggja hesar skal vera. Partur av hesum er meting um samstarvsmøguleikar.

Uppskot til arbeiðssetning:

1. Demografi
   a. Gerast skal framrokning av íbúgvaratali næstu 30 árini í aldursbólkunum 60+ og 85+ fyri Tórshavnar kommunu sum heild.
   b. Gerast skal samanberilig lýsing av lutfalsliga talinum av 60+ og 85+ í Tórshavnar kommunu við Norðurlond nú og fyri tey næstu 30 árini.
   c. Gerast skal samanberilig lýsing í mun til væntaðan miðal livialdur í Tórshavnar kommunu (ella Føroyum) við Norðurlond nú og tey næstu 30 árini.

2. Tørvur á stovnsplássi
   a. Gerast skal lýsing av verandi plásskapasiteti í Tórshavnar kommunu í mun til lutfall av eldri 60+ og 85+ samanborið við Norðurlond.
   b. Gerast skal lýsing av miðalaldri á teimum, sum hava búpláss í Tórshavnar kommunu, samanborið við Norðurlond.
   c. Gerast skal lýsing av, hvussu leingi hvørt búfólk í miðal býr á røktarheimi samanborið við Norðurlond.
   d. Gerast skal lýsing av mettum tørvi á búplássum næstu 30 árini við støði í:
      i. Demografisku broytingunum og verandi lutfalli av búplássum/eldri í Tórshavnar kommunu.
      ii. Demografisku broytingunum samanborið við verandi (og møguliga framtíðar) lutfall av búplássum/eldri í Norðurlondum.
      iii. Møgulig broyting av samanseting av búplássum næstu 30 árini, tvs. tal/lutfall vanlig røktarpláss, demenspláss, umlættingarpláss, samdøgursrehabiliteringspláss v.m.
   e. Gerast skal meting av íløgutørvi í búpláss komandi 30 árini, harundir at endurútvega verandi ótíðarhóskandi pláss.

3. Alternativir bústaðir til eldri røktarkrevjandi – íbúðir, íbúðardeplar v.m.
   a. Gerast skal lýsing av skipanum við eldraíbúðum/íbúðardeplum til røktarkrevjandi í Norðurlondum, har eldrarøktartænasta ella aðrar tænastur so sum dagtilhald ella annað er knýtt at.
   b. Gerast skal lýsing av, hvussu slíkar eru skipaðar rakstrarliga og fíggjarliga í mun til útvegan av íbúðum (íløga) og rakstur (leiguíbúð, eigaraíbúð v.m.).
   c. Gerast skal lýsing av føroyskari lóggávu á hesum øki, leiklutin hjá kommununi og møguleikar fyri samstarvi við aðrar aktørar, eitt nú Bústaðir, íleggingarstovnar v.m., og eyðmerkja møguligar forðingar.

4. Við støði í pkt. 1-3 skal gerast uppskot til strategi og íløguætlan komandi 30 árini.
   a. Partur av hesum er at geva ítøkiligt konseptuppskot til:
      i. Bygging av nýggjum røktarheimsplássum komandi 10 árini.
      ii. Bygging av alternativum bústøðum (íbúðir v.m.) til røktarkrevjandi, harundir samstarv við Bústaðir, aðrar íleggjarar v.m.

Uppskot til skipan av verkætlan:

a) Sett verður verkætlanarfólk undir leiðslu av trivnaðarstjóranum at standa fyri greiningararbeiðinum pkt 1-3 at vera liðugt ultimo august 2016.
b) Parallelt við hetta arbeiðið verður settur arbeiðsbólkur at gera ítøkilig uppskot til staðseting og konsept fyri bygging av røktarheimsplássum og íbúðum til røktarkrevjandi at vera liðugt ultimo august 2016.
    a. Bólkurin verður mannaður við umboðum fyri teknisku fyrisiting og trivnaðarfyrisitingina. Onnur kunnu takast inn í arbeiði eftir tørvi og keypast kann inn uttanhýsis ráðgeving.
c) Settur verður stýrisbólkur, ið er umboð fyri trivnaðarnevndina, fíggjarnevndina og stjórnina, at leiða og fylgja øllum verkætlanararbeiðinum.

Mett verður, at í fyrsta umfari er tørvur á kr. 500.000 til verkætlanarútreiðslur, harundir løn, ráðgeving, íblástur v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at samtykkja omanfyri nevnda arbeiðssetning og skipan og at játta kr. 500.000 av íløgukontu 2775 eldrarøkt ætlað til endamálið.

**Trivnaðarnevndin 07. marts 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Harumframt samtykt at heita á byggi- og býarskipanar-nevndina um beinanvegin at vísa á uppskot til staðsetingar at byggja íbúðardepil við 20-30 bústaðareindum við felagsfasilitetum .

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 500.000,00 av iløgukonto 2775, eldrarøkt, og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Endamálið við verkætlanini var at fáa til vega haldgott grundarlag fyri langtíðarstrategi og politiskum raðfestingum í mun til eldrabústaðir. Partur av arbeiðssetninginum var eisini at fáa til vega uppskot til staðseting og konsept fyri røktarheimsplássum og íbúðum til røktarkrevjandi.

Býráðið fekk í august handað frágreiðing við heitinum "Frágreiðing um framtíðartørvin á búplássum til eldri í Tórshavnar kommunu", ið somuleiðis er løgd fram fyri býráðnum. Hesin parturin av arbeiðssetninginum er liðugur, meðan hin parturin fyri fyrst er tikin upp í fyrisitingini og í samskifti við Bústaðir.

Kostnaður fyri frágreiðingina, ið er útreiðslur til verkætlanarfólk og gjald til Hagstovuna fyri fólkaframskrivingum, er kr. 124.440. Avlopið á løgukontu 2775 Eldrarøkt L27008 Íbúðardepil til eldri er sostatt kr. 375.560, sum verður at falla aftur til løgukarmin 2775 Eldrarøkt.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at loka løgukontu 27 Eldrarøkt L27008 Íbúðardepil til eldri, og at avlopið kr. 375.560 verður flutt aftur til løgukarmin 2775 Eldrarøkt.

**Trivnaðarnevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

# 331/16 Møgulig søla av Dagstovninum millum Bóla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 200/16 | 16/02101-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 181/16 | 16/02101-1 |
| 3 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 172/16 | 16/02101-1 |
| 4 Kollafjarðarnevndin | 05.09.2016 | 12/16 | 16/02101-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 359/16 | 16/02101-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 387/16 | 16/02101-1 |
| 7 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 331/16 | 16/02101-1 |

**Málslýsing:**
Nýggi dagstovnurin í Kollafirði er eftir ætlan klárur at taka í nýtslu eftir summar, og tí er ikki brúk fyri Dagstovninum millum Bóla, matr.nr. 329, Kollafjørður.
Grundstykkið er uml. 1600 m².
Stovnurin er í 2 hæddum á 170 m2 = 240 m2.
Húsið er bygt í 1970.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at selja matr.nr. 329, Kollafjørður.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at mæla til at søluupphæddin verður inntøkuførd á grein 3.

**Ískoyti:**
Víst verður til kommunustýrislógina **§ 49.** Ikki er loyvt kommunum at fíggja rakstur, rentur og avdráttir við lántøku ella við inntøku frá sølu av fastari ogn.

Vanliga mannagongdin er, at keyp verða inntøkuførd á konto 6175. Mælt verður til at inntøkuføra søluupphæddina á konto 6175. Flyting millum íløgur og rakstur skal fyri sum ein eykajáttan.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla til at fylgja vanligu mannagongd og at keypið verður inntøkuført á konto 6175.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Kollafjarðarnevndin 05. september 2016:** Staðbundna nevndin í Kollafirði mælir staðiliga frá at húsini verða seld. Ístaðin at nýta tey til dagtilhald til eldri o.a. sum víst verður á í skjalinum sum er handað.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Samtykt at vísa til og halda fast um samtyktina hjá býráðnum í málinum 16. juni 2016.

**Ískoyti:**
Bjørghild Djurhuus, býráðslimur, biður um at fáa málið á skrá.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Bjørghild Djurhuus um, at beina málið í trivnaðatnevndina til tess at fáa ummæli til uppskotið frá staðbundu nevndini í Kollafirði sent 07.11.2016, um at nýta húsini til tilhald, ítriv o.a. heldur enn at selja tey, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 2 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Ímóti atkvøddu:
Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu:
Tróndur Sigurðsson,

# 332/16 Keyp av vinnubygningi á Hjalla 15, matr. 100, Hoyvík (2013-0466)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 62/14 | 14/00613-43 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.12.2014 | 335/14 | 14/00613-43 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.04.2015 | 96/15 | 14/00613-43 |
| 4 Býráðsfundur | 15.12.2014 | 261/14 | 14/00613-43 |
| 5 Fíggjarnevndin | 15.12.2014 | 348/14 | 14/00613-43 |
| 6 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 78/15 | 14/00613-43 |
| 7 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 422/16 | 14/00613-43 |
| 8 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 332/16 | 14/00613-43 |

**Keyp av vinnubygningi á Hjalla 15, matr. 100**

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Kommunan hevur havt samráðingar við Eik um at keypa vinnubygningin á Hjalla matr. nr. 100, Hoyvík.

Eik hevur ætlanir um at loysa parkeringstørvin niðan fyri bankan Yviri við Strond 4 og 6. Ynski bankans er at kunna keypa lendi frá kommununi niðan fyri bygningin.

Ein søla av nevnda lendi til Eik krevur góðkenning frá landsstýrinum, sambært kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn.

Ein samlað loysn um keyp og sølu fyriliggur, sum partarnir eru samdir um. Loysnin krevur politiska støðutakan.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og tekniski stjórin mæla fíggjarnevndini til at taka støðu til uppskotið.

**Fíggjarnevndin 23. september 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við at keypa bygningin á matr. nr. 1oo, Hoyvík og fíggja sambært uppskoti til fígging, j.nr. 2013-0466/2, og gera treytaða søluavtalu við Eik um lendi til parkering niðan fyri ognirnar Yviri við Strond 4 og 6.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðið fyri læstum hurðum 26. september 2013:** Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

Einmælt samtykt við teirri treyt, at ætlanin um at gera gøtu fram við sjóvarrmálanum Yviri við Strond ikki verður órógvað.

**Ískoyti:**
Til tess at kunna avgreiða keypið av vinnubygninginum, áðrenn málið um lendisviðursiftini er endaliga avgreitt, er avtalað við Eik, at tað verða rindaðar 11 mió. kr. við undirskrift á skeytið

viðv. matr. nr. 1oo, Hoyvík. Restupphæddin 1,5 mió. kr. fellur bert til gjaldingar, um avtalan um lendið og avgreiðslan av lendisviðurskiftinum viðvíkjandi lendinum niðanfyri høvuðssætið hjá Eik Yviri við Strond, ikki kemur upp á pláss í seinasta lagi við árslok 2014.

Av tí at heimildin frá býráðnum snýr seg um 11 mió. kr., er neyðugt at gera eitt ískoyti til samtyktina hjá býráðnum 26. september 2013, ið heimilar kommununi at rinda 1,5 mió. kr. afturat fyri vinnubygningin á matr. nr. 1oo, Hoyvík, um avtalan um lendið Yviri við Strond ikki er avgreidd í seinasta lagi við árslok 2014.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og tekniski stjóri mæla fíggjarnevndini til at staðfesta samtyktina hjá býráðnum 26. september 2013 við tí ískoyti, at í tann mun, at treytaða søluavtalan við Eik um lendið við høvuðssætið hjá Eik Yviri við Strond ikki ber á mál innan árslok 2014, rindar kommunan kr. 1,5 mió. afturat til Eik fyri keypið av matr. nr. 1oo, Hoyvík.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið fyri læstum hurðum 31. oktober 2013:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Sambært játtanar-reglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin 'Bygningur til Lendisdeildina', L62007, skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest avlop álj. kr. 27.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Útsett.

**Ískoyti:**
Avtalan við Eik Banka um lendið við høvuðssætið hjá bankanum er m.a. treytað av, at øll viðurskifti, s.s. byggiloyvi, loyvi frá kommunala eftirlitinum, loyvi frá friðingarmyndugleika o.l. skulu vera komin uppá pláss innan árslok 2014. Nú vit eru við árslok 2014 kann staðfestast, at flest øll loyvi eru komin, men viðgerðin í Yvirfriðingarnevndini er ikki liðug, og tí er ynskiligt, at ískoytisavtala verður gjørd, ið leingir avtalufreistina til 30. apríl 2015.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir umvegis fíggjarnevndina býráðnum til at samtykkja, at avtalan millum Eik Banka og kommununa verður longd soleiðis, at avtalan er galdandi til 30. apríl 2015.

**Fíggjarnevnd 15. december 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 15. desember 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sum nevnt í ískoytinum omanfyri, er avtalan millum kommununa og Eik Banka um lendið hjá bankanum Yviri við Strond, treytað av, at øll viðursskifti upprunaliga skuldu koma uppá pláss innan 31 des. 2014, við leingja til 30. apríl 2015, sambært samtykta ískoyti hin 15. des. 2014. Neyðugt er enn einaferð at leingja avtaluna millum kommununa og Eik Banka. Loyvið frá Yvirfriðingarnevndini er komið, men matrikulviðurskiftini eru enn ikki avgreidd og væntast kann, at tað ganga mánaðir áðrenn málið er avgreitt á matrikulstovuni, tí er ynskiligt, at enn eitt ískoyti verður gjørt, ið leingir avtalufreistina til 31. des. 2015.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin mælir, umvegis fíggjarnevndina, býráðnum til at samtykkja, at avtalan millum Eik Banka og kommununa verður longd til 31. desember 2015.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Málið verður lagd fyri aftur, fyri at enda fíggjarliga partin av keypinum av bygninginum og loka verkætlanina

Á verkætlanini L62007, Bygningur til Lendisdeildina, stendur eitt avlop uppá kr. 27.000

Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Kunnað varð um málið, sum verður beint í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Kunnað varð um málið.

| | **Býráðsfundur**<br>15. desember 2016 | Blað nr.: 13713 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

## 333/16 Víðarisøla matr. nr. 1322k, Tórshavn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 424/16 | 16/04490-2 |
| 2 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 333/16 | 16/04490-2 |

**Málslýsing:**

Matr.nr. 1322k, Tórshavn.
Óðinshædd 17
Grundstykkið er útgrivið og planerað, men annars óbygt.

Uppskot til treytað skeyti fyriliggur, har P/F Formula, selur grundstykkið til Bústaðir. Bústaðarfelag føroyar.

Sølan er treytað av at loyvi fæst frá kommununi til víðarisøluna av grundstykkinum, og av at Byggisamtyktin fyri økið verður broytt, soleiðis at hon samsvarar við tær ætlanir sum keyparin hevur. ( Bygging av bústøðum )

Víðarisøluskeytið er hjálagt hesum málið sum skjal 16/04490-3.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at loyva víðarisølu av ognini, sí uppskot til skeytið skjal 16/04490-3

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

## 334/16 Matr. nr. 13221, Tórshavn. Víðarisøla av ognini. Seljari. P/F Føroya Møblasøla. Keypari. Bústaðir.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 418/16 | 16/04491-2 |
| 2 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 334/16 | 16/04491-2 |

**Málslýsing:**

**Víðarisøla av matr. nr. 1322i, Tórshavn.**

Matr.nr. 1322i, Tórshavn.
Óðinshædd 15
Grundstykkið er partvís útgrivið og planerað, men annars óbygt.

Uppskot til treytað skeyti fyriliggur, har P/F Føroya Møblasøla selur grundstykkið til Bústaðir.

Sølan er treytað av at loyvi fæst frá kommununi til víðarisøluna av grundstykkinum, og av at Byggisamtyktin fyri økið verður broytt, soleiðis at hon samsvarar við tær ætlanir sum keyparin hevur. ( Bygging av bústøðum )

Víðarisøluskeytið er hjálagt hesum málið sum skjal 16/04491-3.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at loyva víðarisølu av ognini, sí uppskot til skeytið skjal 16/04491-3

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

# 335/16 Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Karlamagnusarbreyt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.12.2016 | 275/16 | 16/04447-1 |
| 2 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 335/16 | 16/04447-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til mál nr. 16-03808, har samtykt varð at heita á umsitingina um at endurskoða ásetingarnar fyri økið. (sí hjálagda skjal 16/03808-2)

Meginreglan við skipanini av byggingini fram við Karlamagnusarbreyt er, at mest loyvda hædd á bygningunum fylgir eini linju, ið hevur eitt sindur minni hall enn longdarskurðurin av Karlamagnusarbreyt. Hetta hevur við sær, at hvørt einstakt byggifelt kann hava eina max kotu, sum er hægri enn byggifeltini frammanfyri, og harvið hava møguleika at fáa eitt sindur av útsýni.

Verður loyvið givið til at byggja hægri enn byggisamtyktin ásetur, er meginreglan brotin og tí er tað av týdningi, at verða broytingar framdar, so er týdningarmikið at hesar broytingar eru galdandi fyri størri økir (fleiri byggifelt) og ikki einans fyri eitt serstakt byggifelt. Tað er somuleiðis týdningarmikið, at keypararnir í økinum hava eina meginreglu at fyrihalda seg til, eisini teir, ið longu hava keypt og bygt.

Býarskipanardeildin hevur hugt eftir umsóknini, har ynski hjá keypara av stykki nr. 29, matr. nr. 138db, er at hækka hæddarmarkið upp til 10 m.

Mett hevur verið um umsóknina fyri stykki nr. 29, har nærum eingir bygningar eru bygdir. Í hesum førinum verður ikki mett, at broytingin av hæddini broytir útstykkingina munandi, ei heldur kemur broytingin at ávirkað aðrar grannar í økinum neiligt.
Sí viðheftu skjøl: 16/04447-2,3,4 og 5.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta mest loyvdu hædd á stykkjunum sambært viðheftu skjølum, og at beina málið í Býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

## 336/16 Fríøkið við Myllutjørn - Karlamagnusarbreyt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.11.2015 | 238/15 | 14/01477-5 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2016 | 50/16 | 14/01477-5 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.10.2016 | 271/16 | 14/01477-5 |
| 4 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 373/16 | 14/01477-5 |
| 5 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 300/16 | 14/01477-5 |
| 6 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 336/16 | 14/01477-5 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við skipanin av Karlamagnusarbreyt, varð økið sett av til eitt alment fríøki mitt í býarpartinum. Ætlanin var at økið skuldi brúkast til ymisk felags tiltøk í býarpartinum og skapa samband til býlingarnar í økinum. Meðan Karlamanusarbreyt og Myllutjørn vórðu bygd, varð økið brúkt til tilfarsgoymslu.

Umsitingin hevur gjørt uppskot um at skipa og fríðka økið. Endamálið er at gera eitt felags fríøki fyri allan býarpartin, sum knýtir Karlamagnusarbreyt saman við Dalinum Langa og býlingunum í grannalagnum. Sí 14/01477-6 skjal 1 og 2).Økið verður skipað við:

1. Atkomupláss
2. Felags pláss beint við Karlamagnusarbreyt til almenn tiltøk, jólatræ v.m.
3. Almenningur. Grasað øki til frítt spæl og uppihald.
4. Myllutjørn. Tjørnin verður skipað við 0,5 m dýpi, laðaðir kantar fram við pørtum av tjarnarbakkanum.
5. Skreiðibreyt.
6. Lívdarplanting.
7. Gøtusamband til Dalin Langa og býlingarnar Myllutjørn og Hoyvíkshagi Suður.

Í fyrsta umfari verður verandi tilfar á staðnum grovplanerað og bleytbotnurin av Myllutjørn verður skiftur út við fast tilfar. Gøturnar verða skipaðar, og mold til gras- og plantuøkir verður útvegað. Síðani verður gjørt kostnaðarmeting av liðugtgerð.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at raðfesta 500.000,- kr. av konto 6210, Fríðkan av býnum, til skipan av økinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tilboð á skipan av fríøki við Karlamagnusarbreyt eru innkomin. Talan er um, at í fyrsta umfari verður verandi tilfar á staðnum grovplanerað og bleyti botnurin av Myllutjørn verður skiftur út við fast tilfar.

Tilboðini eru áljóðandi:

| | | |
|---|---|---|
| Sp/f Við Sjógv | kr. | 550.000 uttan mvg. |
| Sp/f Maskinkoyring: | kr. | 839.300 uttan mvg. |

Samlaða kostnaðarmetingin er til samans 660.000, um tikið verður av lægra tilboðnum:

| | | |
|---|---|---|
| HVÙ | kr. | 550.000 |
| Mvg (6,25%) | kr. | 34.375 |
| Prosjektumsiting (3%) | kr. | 16.500 |
| Ókent (10%) | kr. | 55.000 |
| Tilsamans | kr. | 655.875 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka av lægsta tilboðnum og at játta samlaða kostnaðin á 660.000,- kr. av konto 6210, Fríðkan av býnum, til skipan av økinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Sp/f Við Sjógv og Sp/f Maskinkoyring geva tilboð uppá fríøki við Karlamagnusarbreyt, 2. Byggistig, tann 26. oktobur 2016. Talan er um tilboð á skipan av fríøkinum, parkeringspláss og gøtur, sambært viðheftu skitsutekningum.

Umsitingin viðger innkomnu tilboðini og ger tilmæli til fundin. Tilboðini verða løgd í málið og kunnu síggjast á nevndarportalinum frá 28. oktobur 2016.

**Tilmæli:**
Samlað kostnaðarmeting og tilmæli kemur til fundin.

**Ískoyti:**
Tilboð á fríøki við Karlamagnusarbreyt, 2. Byggistig eru innkomin.

Tilboðini eru áljóðandi:
Sp/f Við Sjógv 3.004.000,00 kr. uttan mvg.

Sp/f Maskinkoyring 3.002.500,00 kr. uttan mvg.

Umsitingin hevur gjørt sparingar á tilboðið. Parkeringsplássið er tikið úr tilboðnum. Samlaða kostnaðarmetingin er til samans 2.991.900,00 kr. við mvg. um tikið verður av lægra tilboðnum, sí viðheftu kostnaðarætlan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka av lægsta tilboðnum og at játta samlaða kostnaðin á 2.991.900,00 kr. av konto 6210, Fríðkan av býnum, til fríøki við Karlamagnusarbreyt, 2. Byggistig.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 2.991.900 av konto 6210, fríðkan av býnum, á konto 6275 og beina málið í býráðið at viðgera tvær ferðir.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

# 337/16 Karlamagnusarbreyt. Møgulig umskipan av byggifeltunum nr. 23 og 25 á Karlamagnusarbreyt.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 327/16 | 16/03852-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.12.2016 | 279/16 | 16/03852-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 421/16 | 16/03852-2 |
| 4 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 337/16 | 16/03852-2 |

**Málslýsing:**

| Stykki nr. | Matr. nr. | Fermetrar | Byggifelt | Hædd | Prísur |
|---|---|---|---|---|---|
| 23 | 138cv | 2.029,00 | 1041 | 11,5 | 2.374.495,63 |
| 25 | 138cx | 1.531,00 | 801 | 5,20 og 8,20 og 11,20 | 1.791.996,45 |

Byggifeltini nr. 23 og 25 eru stór samstundis sum parkeringsviðurskifti og atkoma eru trupul.

Møguligur keypari er til part av byggifelti nr. 23, men tykist trupult at selja byggifeltini sum tey liggja í løtuni.

Hugsanin er at byggi- og býarskipanardeildin viðgerð og kemur við einum tilmælið uppá hvørjir møguleikar eru fyri at umskipa økið, t.d. í smærri byggifelt og við betri parkeringsviðurskiftum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Karlamagnusarbreyt er skipað í liniærum byggifeltum, og í ætlanini fyri Karlamagnusarbreyt er byggingin á liniæru byggifeltunum lýst at verða langar stengur, sum verða deildar av Karlamagnusarbreyt.
Tað er ymiskt hvussu byggifeltini eru skipaði niðan eftir Karlamagnusarbreyt í liniær byggifelt, rúmlig byggifelt og tvídeild byggifelt.

Lýsingin sæst niðanfyri fyri tvídeildu byggifeltini, sum talan er um á nr. 23 og 25:

**<u>Tey tvídeildu byggifeltini (sí somuleiðis skjal 16/03852-6):</u>**
Økið til henda bygningin er 17-20 metrar breitt og 80 metrar langt, avbrotið av Karlamagnusarbreyt. Hettar merkir, at talan er um 2 byggifelt við umleið hesum mátum:

Støddir: Hæddir: Mesta hædd í mun til Karlamagnusarbreyt verður ásett í serstakari byggisamtykt.

Longd: 2 bygningar + Karlamagnusarbreyt verða íalt 80

Breidd á byggifelti: 17-20 metrar

(Bygningur 5 – 7 metrar + millumrúm 5 – 7 metrar + bygning 5 – 7 metrar)

Uppdeildu bygningarnir eru smalar stengur, har tað letur seg gera, og samanbygdar eindir, har tað ikki letur seg gera at deila teir upp.

Almenna rúmið, sum verður millum uppdeildu lonirnar, kann t.d. vera ein arkada, sum bindur saman ymsu funktiónirnar, ið rúmast í bygningunum. Rúmið, sum liggur ímillum lonirnar, kann í ávísan mun yvirbyggjast.

Støddin fyri samlaða økið er 17 – 20 metrar, uppdeilt í 2 lonir og millumrúm. – ella ein bygningur við arkadu.

Hesi byggifelt eru vælegnað til tænastuveitingar og smáhandlar í niðastu hædd, skrivstovur/íbúðir í miðhædd og á ovastu hædd.

Sjálvt um broytingar hava verið gjørdar á Karlamagnusarbreyt í tilgongdina, so hevur tað í størstan mun verið hildið fast í uppruna ætlanunum við Karlamagnusarbreyt, og metir Býarskipanardeildin, at tað framhaldandi skal haldast í hesi ætlan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at broyta útstykkingina, men at halda fast í uppruna ætlanini fyri Karlamagnusarbreyt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. desember 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Helena D. á Neystabø, mælir til at selja part av byggifelti nr. 23.

Ein minniluti, Jákup Dam og Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Atkvøtt varð um tilmæli frá meirilutanum í fíggjarnevndini, um at selja part av byggifelti 25, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu:
Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Greiddu ikki atkvøðu:
Elin Lindenskov og Sigrun Mohr.

# 338/16 Gøtunavn til útstykking undir Kongavarða, matr. nr. 255a, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 22.08.2016 | 7/16 | 16/03091-2 |
| 2 Gøtunavnanevndin | 20.09.2016 | 10/16 | 16/03091-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 268/16 | 16/03091-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 02.11.2016 | 280/16 | 16/03091-2 |
| 5 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 338/16 | 16/03091-2 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við nýggja útstykking undir Kongavarða er heitt á gøtunavnanevndina um at koma við uppskoti til gøtunavn til útstykkingina. Tekning er hjáløgd.

**Gøtunavnanevndin 22. august 2016:** Málið varð umrøtt og verður viðgjørt aftur á næsta fundi.

**Gøtunavnanevndin 20. september 2016:** Nevndin mælir til at nevna vegin Sørinargøta eftir Søren Emil Müller, sum var borgarstjóri 1913-1920. Hann var eisini bóndi og hevði hetta lendið í festi.
Vegurin á ætlaðu útstykkingini vestureftir kann so verða uppkallaður eftir næsta borgarstjóra í røðini, Anton Fr. Degn.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at velja millum hesi uppskot: 1. Undir Kongavarða: Tað hevur við sær at talmerkingin í adressunum verður tillagað og at allur býlingurin fær sama navn.

2. Við Tvættá: Er talan um á sum rennur eystanfyri økið og er millum sjálvt økið og Skúlan á Argjahamri. Ætlandi verður gongubrúgv til skúlan gjørd tvørturum Tvættánna.

3. Undir Suðurvarða: Er talan um varða á Reyninum, sum er skamt frá økinum. Suðurvarði sæst í ein beinan sunnan úr Vágsbotni og hevur søguliga havt týdning sum peilimerki eins og Vesturvarði.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Útsett.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at velja millum hesi fýra uppskotini:
1. Undir Kongavarða: Tað hevur við sær, at talmerkingin í adressunum verður tillagað, og at allur býlingurin fær sama navn.

2. Við Tvættá: Er talan um á, sum rennur eystan,fyri økið og er millum sjálvt økið og Skúlan á Argjahamri. Ætlandi verður gongubrúgv til skúlan gjørd tvørtur,um Tvættánna.
3. Undir Suðurvarða: Er talan um varða á Reyninum, sum er skamt frá økinum. Suðurvarði sæst í ein beinan sunnan úr Vágsbotni og hevur søguliga havt týdning sum peilimerki eins og Vesturvarði.
4. Við Klingrutjørn: Er talan um lítla tjørn skamt oman fyri byggiøkið.

**Mentamálanevndin 02. november 2016:** Samtykt at gøtunavnið til útstykkingina verður *Klingrutjørn* og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Mentamálanevndin samtykti 2. november 2016, at gøtunavnið skal vera *Klingrutjørn*.
Umsitingin metir, at formliga gøtunavnið heldur eigur at vera "við Klingrutjørn".

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at formliga gøtunavnið verður "við Klingrutjørn".

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

# 339/16 Dagføring av vegnum undir Bryggjubakka- við uppihaldstrappuna har Perlan hevur staðið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.03.2015 | 89/15 | 15/00790-6 |
| 2 Tekniska nevnd | 17.03.2015 | 38/15 | 15/00790-6 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.03.2015 | 73/15 | 15/00790-6 |
| 4 Býráðsfundur | 19.03.2015 | 49/15 | 15/00790-6 |
| 5 Tekniska nevnd | 02.03.2016 | 35/16 | 15/00790-6 |
| 6 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 114/16 | 15/00790-6 |
| 7 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 85/16 | 15/00790-6 |
| 8 Tekniska nevnd | 29.11.2016 | 120/16 | 15/00790-6 |
| 9 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 429/16 | 15/00790-6 |
| 10 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 339/16 | 15/00790-6 |

## Málslýsing:

Í sambandi við arbeiðið at planleggja uppihaldstrappuna, har sum Perlan á sinni stóð, er uppskot komið frá Zeta arkitektum um at broyta vegaføringina á brekkuni niðan á Bryggjubakka.  Víst verður í hesum sambandi til mál nr. 14/05063, at støða er tikin til linjuføringina av niðankoyringini á Bryggjubakka og staðfest av teknisku nevnd. Í nýggja uppskotinum verður hallið á vegnum betri, og vegurin gerst somuleiðis ein betri inngongd til Reyn. Broytta vegaføringin gerst ein betri liður í ferðslumynstrinum í Vágsbotni, ið bindur teir ymsu vegirnar og gonguteigarnar saman. Umstøðurnar gerast betri og tryggari hjá fólki til gongu, tí umskipanin letur upp fyri einum øki framman fyri uppihaldstrappuni, sum gerst ein gonguleið og sambindingarliður í ferðslumynstrinum. Ein nýggj umskipan av vegnum gerst harafturat eitt gott byrjanarstøði í eini møguligari framtíðarætlan fyri torgið í Vágsbotni, tí vegurin verður sneiddur ímóti torginum, sum er ein týdningarmikil liður í eini skipan av einum nýggjum torgi.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Sambært metingum frá Zeta arkitektum kemur dagføringin av vegnum at kosta uml. 2,1 mió. kr. Higartil eru játtaðar kr. 100.000,- av kto. 8175 til skitsuuppskot við kostnaðarmeting, so írestandi arbeiðið tørvar eina játtan álj. kr. 2.016.000,-. Lisitatión fyri innbodnum arbeiðstakarum ísv. undirhondsboð verður hildin 16.03.2015, og tá ber til at upplýsa ítøkiligari hvussu kostnaðarstøðið verður.

## Tilmæli til teknisku nevnd:

Tekniski stjórin og býarverfrøðingurin mæla til at játta kr. 2.016.000,- av kto. 8175 fyri vegir 2015 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. mars 2015:** Kunnað varð um málið.

**Tekniska nevnd 17. mars 2015:** Nevndin samtykti at játta kr. 2.740.000 av konto 8175 samsvarandi skjali nr. 15/00790-11 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Ìskoyti:**

Trý tilboð eru komin inn at gera dagføra vegin og gera uppihaldstrappuna (mál 14/05063). Talan er um samlað tilboð fyri bæði arbeiðini, sí j.nr. 15/00790-10.

Sp/f Andrias Berg hevur lægsta tilboðið áljóðandi kr. 2.344.767,00.

Articon hevur næstlægsta tilboðið áljóðandi kr. 3.208.235,00.

J&K Petersen hevur boðið sær at gera arbeiðið fyri kr. 3.422.178,00.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at taka av lægsta tilboðnum hjá Sp/f Andriasi Berg og viðvíkjandi arbeiðinum at dagføra vegin at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 2.740.000 av konto 8175 samsvarandi skjali nr. 15/00790-11 og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevnd 18. mars 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sum kunnugt hava fleiri trupulleikar verðið við Uppihaldstrappuni í Vágsbotni og dagføring av vegi niðan á Bryggjubakka, sum hava havt seinkingar við sær. Hetta hevur eisini havt meirkostnað við sær. Grótveitarin hevur ikki megnað at fáa tilfarið fram til tíðina, við tí avleiðing at meirútreiðslur hava verðið fyri arbeiðstakara og byggiharra. Arbeiðið hevur ligið stilt eina tíð, men er nú byrjað aftur, og grót er niðurfyri. Eisini hevur trappuprosjektið skula broytt og tillagað seg gjøgnum byggitíðina við viðmerkingum og krøvum frá Fornminnisnevndini. Ein loysn tykist nú endiliga verða komin undir land.

Eisini hava meirútreiðslur verðið av umleggingum av kaðalum og leiðingum í vegnum, sum mann ikki var vitandi um, áðrenn arbeiðið fór ígongd.

Talan er um tvær ymiskar verkætlanir, sum eru bodnar út saman og samstundis, og har sami arbeiðsgevari er á báðum verkætlanum.

Samlaða hækkingin fyri báðar verkætlanirnar er kr. 710.000,00 tilsamans. Torført er at gera upp nágreiniligt býti, men helvtarbýti verður mett at verða á góðari leið.

Krøv og broytingar frá Fornminnisnevndini, verða mett at verða kr. 300.000. Seinkingar frá grótveitara verður mett til 300.000,00 kr., her íroknað til- og avriggingar í sambandi við Voxbotn, ólavsøku og jól.
Broytingar av verandi kaðalleggingum, hevur ein meirkostnað á kr. 160.000 við sær.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at hækka játtanina við kr. 355.000,00 av 8175 – "aðrar vegaverkætlanir" og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 02. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið i býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin Brekkan niðan á Bryggjubakka, skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest eitt avlop uppá kr. 1.581,50.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Kunnað varð um málið, og málið beint í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>15. desember 2016 | Blað nr.: 13726<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## 340/16 Uppskot til broyting av almennu byggisamtyktini fyri B6 vinnuøkið Yviri við Strond

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.05.2015 | 129/15 | 15/01720-1 |
| 2 Býráðsfundur | 22.06.2015 | 126/15 | 15/01720-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2015 | 177/15 | 15/01720-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 195/15 | 15/01720-1 |
| 5 Býráðsfundur | 29.10.2015 | 188/15 | 15/01720-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.12.2016 | 301/16 | 15/01720-1 |
| 7 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 340/16 | 15/01720-1 |

**Málslýsing:**
B6 vinnuøki Yviri við Strond hava m.a. ásetingar, í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, um mest loyvdu hædd av bygningi uppá 8,0 m. Í einum parti av hesum økinum er planeringshæddin uml. 6 m undir veghædd.

Eik Banki hevur ætlanir um at utbyggja høvuðssæti Yviri við Strond við, at byggja eina hædd omaná verandi bygning og opna bygningin meira ímóti høvuðsvegnum Yviri við Strond við eini útbygging til høvuðsinngond. Verandi bygningur liggur fyri stóran part undir høvuðsvegnum.

Umsitingin metir, at tað hevði verið rættari at ásett eina mestu hædd á bygging í mun til høvuðsvegin, t.d. mest loyvda hædd er 10 m oman fyri veghædd.

Av tí at B6 vinnuøkið liggur upp at Skansanum, ásetur byggisamtyktin fyri B6 vinnuøki eisini, at bygging einans má fara fram, eftir at loyvi er fingið frá friðingarnevndini.

Friðingarnevndin hevur viðgjørt fyribils tekningar fyri ynsktu útbyggingina og góðkent ætlanina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at kap. 4, §13, stk. 7 í almennu byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu, verður broytt frá;

Eingi hús og eingin húsalutur má vera hægri enn 8 m.

Til

Eingi hús og eingin húsalutur má vera hægri enn 10 m yvir vegin Yviri við Strond á strekkinum út fyri bygningin.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. mai 2015:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur støðu á býráðsfundinum.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Seinasta freist at mótmæla broytingini av almennu byggisamtyktini fyri B6-øki var 7. september 2015. Tá freistin var farin, høvdu vit móttikið tvey mótmæli/viðmerkingar, eina frá Mentamálaráðnum og eina frá Søvn landsins, sum mest handlar um umsóknina um útbygging av Eik banka.

Poul Gert Hansen boðar vegna Mentamálaráðið frá, at orsakað av at nýtt landsstýri ikki er skipað eftir løgtingsvalið 1. september 2015, ber ikki til hjá Mentamálaráðnum at gera viðmerkingar til málið innan freistina 7. september 2015. Mentamálaráðið vil við hesum boða frá, at hoyringsskriv verður sent kommununi, tá landsstýrið er skipað.

Tórálvur Weihe boðar frá vegna Søvn landsins, at víst verður til viðmerkingar, dagf. 28. desember 2014, sum svar til teldupost frá kommununi 10. desember 2014 (j. nr. 14/03193-10) í sambandi við umsókn um frávik um mest loyvdu hædd fyri B6-øki í sambandi við bygningin hjá Eik. Hann vísir á, at tað er ósamsvar í tekningstilfarinum, sum eru send til Søvn landsins.

Eisini vísir hann á, at longu tá fyrstu ferð varð bygt á økinum í 1975-76, vóru strong krøv sett fram frá kommununi og náttúrufriðingarmyndugleikunum. Náttúrufriðingarnevndin sá helst, at eingin bygningur varð settur á økið, men gingu við til byggingina treytað av, at bygningurin var lægri og fluttur longur oman. Yvirfriðingarnevndin setti harafturat treytir um, at fjøran uttan fyri Skansan og fram við strondini út fyri ætlaða bygninginum verður varðveitt og tað aldrin verður bygt millum hendan bygningin og Skansan.

Til hetta er at siga, at málið um útbygging av Eik banka er viðgjørt av Náttúrufriðingarnevndini fyri Streymoyar sýslu, sum hevur givið góðkenning til ætlanina hjá Eik banka, treytað av at onnur neyðug loyvi eru fingin til vega (j. nr. 14/03193-11). Yvirfriðingarnevndin hevur síðani staðfest hesa avgerð (j. nr. 14/03193-13).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at hildið verður fast um ætlaðu broytingina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2015:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Helena D. á Neystabø og Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tann 1. oktober kom mótmælið frá Mentamálaráðnum, sum er nevnt omanfyri var seinkað orsakað av, at landsstýri ikki var skipað eftir løgtingsvalið 7. september 2015.

Í mótmælinum verður sagt, at broyting í almennu byggisamtyktini fyri b6 vinnuøki Yviri við Strond er av slíkum slag, at tey kunnu hava við sær óbótaligan skaða fyri Havnar skansa, sum er eitt týdningarmiklasta fornminni føroyinga. Tað er tí týdningarmikið, at mett verður um

árinið á mentanarlandslagið og á upplivingina av Skansanum, umframt hvørji samfelagsvirði kunnu fara fyri skeyti í sambandi við at ásetingarnar í byggisamtyktini verða broyttar. Í hesum sambandi var serstaka byggisamtyktin fyri útbygging av Sklansabryggjuni og Eystara havanøki eisini nevnd.

Eisini verður víst til omanfyri standandi mótmæli frá Søvn Landsins har nevnt verður, at fría útsýnið frá Skansanum í ein landnyrðing verður avmarkað, um byggingin oman móti fjøruni verður hægri.

Til hetta er at siga, at málið um útbygging av Eik banka er viðgjørt av Náttúrufriðingarnevndini fyri Streymoyar sýslu, sum hevur givið góðkenning til ætlanina hjá Eik banka, treytað av at onnur neyðug loyvi eru fingin til vega (j. nr. 14/03193-11). Yvirfriðingarnevndin hevur síðani staðfest hesa avgerð (j. nr. 14/03193-13).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at hildið verður fast um ætlaðu broytingina vísandi til, at Náttúrufriðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu og Yvirfriðingarnevndin hava góðkent ætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen og Helena D. á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Tjóðveldi legði fram soljóðandi broytingaruppskot:

Vísandi til mótmælini frá mentamálaráðnum og Søvnum landsins verður mælt býráðnum frá at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini.

Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og trimum ímóti.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Sigrun Mohr, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Anfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Tey, ið atkvøddu ímóti, vóru: Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam.

Broytingaruppskotið hjá Tjóðveldi kom sostatt ikki til atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Eigarar av bygningi í B6 vinnuøkinum yviri við Strond hava víst áhugað fyri at nýta bygningin í økinum til hotellvirksemi.

Av tí at líknandi virksemið er í umhvørvinum, og av tí at B6 økið liggur upp at 2. Grundumráði í almennu byggisamtyktini, verður mett, at virksemið samsvarar væl við økisásetingarnar annars.

Verandi áseting fyri B6 økið er soljóðandi:
§ 13, stk. 1 loyvir einans virkjum ella húsum ætlað til skrivstovur, goymslur og tænastuvirki, ið hava samband við hetta í økinum.

Skal loyvi gevast til hotellvirksemi í økinum, má hendan ásetingin broytast.

Skotið verður upp, at § 13, stk. 1 verður broytt samsvarandi hesum; *"loyvir einans virkjum ella húsum ætlað til* ***miðstaðarbygging****, skrivstovur, goymslur og tænastuvirki, ið hava samband við hetta í økinum".*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at ásetingarnar fyri B6-økið § 13, stk. 1 í almennu byggisamtyktini verður broytt til at verða soljóðandi, "*Loyvt er einans at gera virki og byggja hús, ætlað til miðstaðarbygging, skrivstovur, goymslur og tænastuvirki, ið hava samband við hetta."*

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. desember 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen og Helena D. á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

## 341/16 SEV. Umsókn um at leigusáttmálin um undirlendið undir vindmylluparkini í Húsahaga, verður fluttur til VIndfelagið Húsahagi P/F ( Undir Stovnan )

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 411/16 | 14/00670-33 |
| 2 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 341/16 | 14/00670-33 |

**Málslýsing:**

Elfelagið SEV kunnar um, at mynduleikin krevur, at vindmyllurnar í ávikavist Húsahaga og Neshaga /- á Eystnesi skulu liggja í sjálvstøðugum partafeløgum.

Verandi leigusáttmáli dagfestur 06.10.2014 ( sí skjal 14/00670-31 ), verður tí áteknaður um at Vindfelagið Húsahagin P/F ( undir stovnan ) trýnur inn sum leigari í staðin fyri Elfelagið SEV.

Sáttmálin verður annars óbroyttur galdandi.

Sí ískoyti til verandi sáttmála skjal 14/00670-34.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla fíggjarnevndini til at góðkenna leigaraskiftið.

Talan er um 20 ára sáttmála, og skal leigaraskiftið tískil leggjast fyri býráðið.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

# 342/16 Staðseting av campingøki í Hesti

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Økisnevndin | 01.06.2015 | 15/15 | 15/01762-1 |
| 2 Vinnunevndin | 31.08.2015 | 24/15 | 15/01762-1 |
| 3 Økisnevndin | 02.11.2015 | 19/15 | 15/01762-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 25.11.2015 | 149/15 | 15/01762-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 13.01.2016 | 4/16 | 15/01762-1 |
| 6 Økisnevndin | 30.05.2016 | 11/16 | 15/01762-1 |
| 7 Økisnevndin | 29.08.2016 | 13/16 | 15/01762-1 |
| 8 Hest/Koltursnevndin | 08.09.2016 | 9/16 | 15/01762-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 277/16 | 15/01762-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.12.2016 | 277/16 | 15/01762-1 |
| 11 Økisnevndin | 28.11.2016 | 15/16 | 15/01762-1 |
| 12 Tekniska nevnd | 29.11.2016 | 113/16 | 15/01762-1 |
| 13 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.12.2016 | 71/16 | 15/01762-1 |
| 14 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 342/16 | 15/01762-1 |
| 15 Økisnevndin | 14.12.2016 | 17/16 | 15/01762-1 |
| 16 Náttúru- og umhvørvisnevndin | | | 15/01762-1 |

**Málslýsing**:
Í sambandi við, at økisnevndin vitjaði staðbundnu nevndina í Hesti, bleiv tosað um, at fara undir at gera eitt campingøki niðri á kajøkinum. Av tí at økið er flatt og asfalterað, er lætt at gera nakrar básar til campingbilar/vognar. Eisini er frárensl til ein vesivogn á økinum og lætt er at seta eina el-talvu upp. Brúsur eru til taks í svimjihøllini.

**Tilmæli**:
Økissamskiparin leggur eina skitsu av økinum fram og mælir til, at økisnevndin tekur støðu til verkætlanina og sendir málið víðari til vinnunevndina (Tórshavnar havn) til endaliga støðutakan.

**Økisnevndin 01. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í vinnunevndina.

**Ískoyti:**
Áðrenn endalig avgerð verður tikin um at brúka økið til kampingvognar, eigur ein kostnaðarætlan at verða gjørd fyri at gera økið klárt. Eisini má ein fulfíggja ætlan verða gjørd fyri raksturin av økinum.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til, at áðrenn endaligt loyvi verður givið, má økisnevndin koma við einari kostnaðar- og rakstrarætlan.

**Vinnunevndin 31. august 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:

Fyri at fáa gjørt økið klárt til camping skulu básar uppmerkjast, el-talvur setast upp og ein wc-vognur keypast. Kostnaðarætlanin er sum fylgjandi:

| | |
|---|---|
| Uppmerkjan av básum. | 7.000,- |
| El-talvir til 12 vognar | 17.050,- |
| Uppsetan el-talvir | 5.000,- |
| WC vognur keypast | 65.000,- |
| Tils. | 94.050,- |

Í sambandi við raksturin av økinum er talan um útreiðslur til el, vask av wc og eftirlit við økinum, og verður tað fíggjað við gjald fyri at nýta økið.

**Tilmæli**:
Miðfyrisitingarstjórin og økissamskiparin mælir til, at økisnevndin játtar kr. 94.050,- til geran av campingpláss í Hesti. Peningur skal takast av konto 1316 Effektivisering, menning og strategi.

**Økisnevndin 02. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd til viðgerðar.

**Tekniska nevnd 25. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá miðfyrisitingarstjóranum og økissamskiparanum. Nevndin ynskir tó nærri útgreining um rakstrarábyrgd av kampingplássinum.
Málið beint í náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 13. januar 2016:** Nevndin tekur undir við tilmælinum hjá miðfyrisitingarstjóranum og økissamskiparanum, men ynskir eina lýsing av rakstrinum, sum tekur atlit til umhvørvið.

**Ískoyti**:
Í sambandi við raksturin av einum campingøki í Hesti og Nólsoy so er meiningin, at brúkarin skal gjalda fyri ein bás, el og heitt vatn. Finnast skulu fólk á staðnum, sum eru áhugaðið at taka sær av øllum viðurskiftum í sambandi við campingøkið. Tvs. At kommunan skapar karmarnar meðan tað eru fólk á staðnum, sum umsita og reka campingøkið.

**Økisnevndin 30. maj 2016:** Nevndin samtykti at kanna málið nærri umhvørvisliga og fíggjarliga.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ætlanina, at gera kampingpláss í Hesti og Nólsoy, hevur umsitingin kannað nærri hvørjar umhvørvis- og fíggjarligar avbjóðingar eru hesum viðvíkjandi. Hetta er gjørt í samráð við Visit Tórshavn, sum rekur kampingplássið Yviri við Strond, fyri Tórshavnar kommunu.
Í Tórshavn verður tikið 95,- pr. persón og 50,- fyri streym pr. dag. Tað vil siga, at ein vognur við tveimum vaksnum og tveimum børnum skal gjalda kr. 240,- um dagin. Aðrastaðni verður vanliga kravt kr. 250,- pr. vogn. Um talan verður um 12 pláss á hvørjum stað, við einum leggingarprosentið upp á 30, so er talan um ein umsetning upp á kr. 27.000,- um mánaðin. Hesin peningur skal so nýtast, sum gjald fyri streymýtslu, viðlíkahald og løn.
Á einum slíkum stað skulu fylgjandi hentleikar verða til taks: vatn, wc (brúsa), streymur, bingja til rusk og brunnur til tøming av wc-tanga. Alt hetta er við í málslýsingini undir

kostnaðarætlanini, uttan brunnurin til tøming av wc-tanga. Kostnaðurin fyri ein slíkan brunn verður mettir til uml. kr.10.000,-. Tað vil siga, at samlaða íløgan verður áleið kr. 105.000,-.

**Tilmæli:**
Økissamskiparin mælir nevndini til, at taka støðu til um arbeiðast skal víðari við hesum málið.

**Økisnevndin 29. august 2016:** Málið varð umrøtt og beinir málið í fíggjarnevndina til víðari viðgerð. Økisnevndin ynskir at málið verður viðgjørt í viðkomandi faknevndum fyri at fáa málið avgreitt.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein og Jógvan Arge taka undir við at gera kampingpláss í Hesti og játta kr. 105.000 av konto 6210 og beina málið í faknevndirnar til kunning og í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, vil hava greiðu á, um farleið, ið flytur bilar, framhaldandi verður út í Hest, áðrenn peningur verður nýttur til verkætlanina.

**Hest/Koltursnevndin 08. september 2016:** Kunnað varð um málið.

**Økisnevndin 28. november 2016:** Tikið av skrá.

**Tekniska nevnd 29. november 2016:** Kunnað varð um málið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. desember 2016:** Nevndin tekur undir við ætlanini, treytað av at nøktandi projekt verður lagt fyri nevndina aftur, sum vísir hvussu økið verður skipað í sambandi við spillvatn, burturkast o.a.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. desember 2016:** Nevndin tekur undir við staðsetingini.

**Økisnevndin 14. december 2016:** Nevndin samtykti at avgreiða málið, treytað av at náttúru- og umhvørvisnevndin góðtekur lýsingina í ískoytinum 30. mai 2016.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

## 343/16 Undirskriftir frá íbúgvum í Traðabrekku um trupul atkomuviðurskifti, at eystari endin á vegnum verður bundin í Hoyvíksvegin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 14.01.2016 | 10/16 | 15/04352-4 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.01.2016 | 9/16 | 15/04352-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 12/16 | 15/04352-4 |
| 4 Tekniska nevnd | 10.02.2016 | 13/16 | 15/04352-4 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 77/16 | 15/04352-4 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 69/16 | 15/04352-4 |
| 7 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 112/16 | 15/04352-4 |
| 8 Ferðslunevndin | 23.03.2016 | 29/16 | 15/04352-4 |
| 9 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 42/16 | 15/04352-4 |
| 10 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 140/16 | 15/04352-4 |
| 11 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 116/16 | 15/04352-4 |
| 12 Tekniska nevnd | 03.11.2016 | 107/16 | 15/04352-4 |
| 13 Tekniska nevnd | 29.11.2016 | 112/16 | 15/04352-4 |
| 14 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 428/16 | 15/04352-4 |
| 15 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 343/16 | 15/04352-4 |

**Málslýsing:**
Íbúgvar í Traðabrekku vísa á truplu atkomuviðurskiftini, tí brekkan til økið er so brøtt, serliga um veturin, tá kavi og hálka er. Tí vísa teir á møguleikan at binda eystara enda av Traðabrekku í Hoyvíksvegin. Økið millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin, matr. nr. 726c, er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Tekniska nevnd skal taka støðu til um farast skal undir fyrireikandi arbeiði at gera vegakomu á matr.nr. 726c, Tórshavn og sostatt knýta Traðabrekku í Hoyvíksvegin.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Tað fyriliggur eingin ítøkilig fíggjarlig meting av arbeiðinum at gera vegatkomuna, men væntast kann at kostnaðurin verður uml. 1 mió. kr.

Spurningurin um ferðsluviðurskifti á vegamótinum við Hoyvíksvegin/Stoffalágvegin er ikki viðgjørdur enn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at knýta Traðabrekku í Hoyvíksvegin og at farast skal undir planleggingararbeiðið at leggja fyri nevndina. Mælt verður eisini til at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið við atliti til fígging av kto. 8175 aðrar vegaætlanir 2016.

**Tekniska nevnd 13. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ferðslunevndin 14. januar 2016:** Umsitingin arbeiðir víðari við málinum. Ferðsluteljingar verða gjørdar.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Málið beint aftur í teknisku nevnd vegna ógreið viðurskifti viðvíkjandi ognini 726c og áður samtyktum ætlanum við økinum.

**Ískoyti:**
Málið um matr. nr. 726c, Tórshavn, tók sín uppruna í 2002, tá ið kommunan keypti ognina við tí endamáli at fáa vegasamband millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin. Víst verður í hesum sambandi til mál nr. 14/03899, har tað framgongur, at málið um vegatkomu í byggi- og býarskipanarnevndini 10. oktober 2014 var broytt til at fevna um gøtusamband og p-pláss umframt eitt stykki til at selja. Fíggjarnevndin hevur síðani tikið undir við byggi- og býarskipanarnevndini, har stykki til møguliga sølu verður uml. 500 fermetrar til víddar og at írestandi økið út móti Hoyvíksvegnum verður lagt út til alment parkeringsøki.

Víst verður harumframt til mál nr. 14/0385, 2010-1738 og 2010-1513, har borgarar hava sýnt ognini áhuga.

Málið er sostatt ongantíð komið til teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 10. februar 2016:** Nevndin staðfestir samtyktina frá 13. januar 2016 og beinir málið í byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Víst verður til hesi mál:
1) mál nr. 2002-1884, Tórshavnar kommuna hevur keypt matr.nr. 726c, Hoyvíksvegur 41a. Húsini eru millum Hoyvíksvegin og Traðabrekku, við tí endamáli, at taka húsini niður og føra Traðabrekku út í Hoyvíksvegin.
2) Mál nr. 14/03899, Fíggjarnevndin hevur samtykt at skipa økið sambært tekning, við gøtusambandi millum Hoyvíksvegin og Traðabrekku, einum sethúsagrundøki á uml. 500 $m^2$ og alment parkeringsøki.

Vísandi til mál nr. 14/03899, har býarskipanardeildin hevði eina søguliga gjøgnumgongd av málinum og vísti á, at Tórshavnar kommunnu í 2004 keypti ognina matr. nr. 726c, Hoyvíksvegur 41a, við tí endamáli, at taka húsini niður, og føra Traðabrekku út í Hoyvíksvegin. Mælt var til, at beina málið í teknisku nevnd og ferðslunevndina til støðutakan um vegagerð yvir matr. nr. 726c frá Traðabrekku til Hoyvíksvegin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við teknisku nevnd at fyrireika vegagerð yvir matr. nr. 726c og um pláss er fyri tí, at leggja øki av til eitt sethúsagrundøki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarevndini.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Ferðsluteljingar eru gjørdar við vegamótið Hoyvíksvegur/Stoffalág. Teljingin var frá 02.03 – 09.03. 2016. Tá koyrt verður frá býnum, eru tølini: 3963 áðrenn snarað verður inn á Stoffalágvegin, og 3119 eftir vegamótið. Tølini eru ársdøgnmiðalferðsla.

**Ferðslunevndin 23. mars 2016:** Nú ferðsluteljingar eru gjørdar, metir nevndin, at einki er til hindurs fyri at gera eina íbinding.

**Tilmæli:**
Í framhaldi av tilmælinum til teknisku nevnd 13. januar 2016 og tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina 4. mars 2016, mælir byarverkfrøðingurin til at játta kr. 300.000,- av íløgum fyri vegaætlanir 2016, konto 8175, til at fyrireika vegagerð yvir matr. nr. 726c og um pláss er fyri tí, at leggja øki av til eitt sethúsagrundøki og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Greiddi ikki atkvøðu:
Jógvan Arge.

**Ískoyti:**
Ráðgevi hevur eftir áheitan frá umsitingini útvegað kommununi uppskot og kostnaðarmeting til vegagerð millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin ávikavist við og uttan 10 parkeringspláss (sí j. nr. 15/04352-24 og 26.).

Umboð fyri grannalagið kring Traðabrekku eru kunnað um uppskotið og í skrivi, dagf. 22. oktober 2016, sum er stílað til teknisku nevnd, siga umboðini seg taka undir við uppskotinum (sí j. nr. 15/04352-25).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at tikið verður undir við uppskotinum við 10 parkerings plássum, at arbeiðið verður sett í útboð millum innboðin, og innkomin tilboð verða løgd fyri nevndina til støðutakan.

**Tekniska nevnd 03. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera vegin og 10 parkeringspláss var boðið út til fýra arbeiðstakarar, trý tilboð komu inn og vóru tey hesi:

- P/F Articon kr. 1.232.307,- uttan MVG
- Sp/f Maskinkoyring kr. 1.464.545,- uttan MVG
- Sp/f R. J. Brockie kr. 1.072.958,- uttan MVG

Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting við støði í tilboðnum frá Sp/f R. J. Brockie, sum vísir at útbodna arbeiðið kann gerast fyri tilsamans kr. 1.737.271,- tá MVG, útboð, byggileiðsla, fakeftirlit, trygging umsiting og óvæntað er íroknað (sí j.nr. 15/04352-33).

Undanfarin játtan til arbeiðið er kr. 300.000,- og írestandi upphæddin er sostatt kr. 1.437.271,- fyri at takast kann av tilboðnum frá Sp/f R. J. Brockie uppá arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til at heimila umsitingini at gera sáttmála við Sp/f R. J. Brockie um arbeiðið, at játtaðar verða kr. 1.440.000,- afturat til arbeiðið, fíggjað av ætlaðum íløgum til vegir í 2017 og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina .

**Tekniska nevnd 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at beina málið í teknisku nevnd.

# 344/16 Umsókn um at kommunan tekur yvirtekur vegastubba á matr. 790r Tórshavn - á Heiðavegi 6 - vegaatgongd til nr. 8.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.08.2016 | 75/16 | 16/00393-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 430/16 | 16/00393-3 |
| 3 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 315/16 | 16/00393-3 |
| 4 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 344/16 | 16/00393-3 |

**Málslýsing:**
Eigarin av matr. 790r, Heiðavegur 6, har uml. 80 fermetrar í norðara enda á økinum eru vegaatkoma til matr. 790an (Heiðavegur 8), hevur søkt um at kommunan tekur yvir hetta økið til kommunalan veg.

Umsiting kommununnar hevur støðulýst vegøkið og kostnaðarmett møguligar ábøtur (j. nr. 16/00393-2). Á innkoyringini er oljugrús, sum er í ivasomum standi. Neyðugt at geva vegnum slitlag av asfalti, ið er mett til 32.000,- kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at boðað verður umsøkjarunum frá, at Tórshavnar kommuna ikki er sinnað at yvirtaka vegin á matriklinum. Mælt verður til at eigararnir av matr. 790r og 790an heldur gera marknaumskipan soleiðis, at nevndi vegastubbi verður lagdur afturat 790an. Við hesi umskipan verður byggistigið á 790an samstundis frá uml. 0,41 til 0,32.

**Tekniska nevnd 30. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, treytað av at undirskriftir frá øllum eigarum fyriliggja.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnt og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at beina málið í teknisku nevnd.

## 345/16 Planlegging av kloakkskipan á Stadionøkinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 29.11.2016 | 114/16 | 16/04347-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 433/16 | 16/04347-1 |
| 3 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 345/16 | 16/04347-1 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við byggivirksemi á stadionøkinum í Gundadali er neyðugt at gera broytingar í kloakkskipanini á staðnum. Hetta er at taka støðu til umleggingar av verandi reinsiverki, somuleiðis umleggja og økja um dimensiónir av verandi og komandi kloakk- og yvirflatuvatns-leiðingum.

Fíggjarlig viðurskifti:
Samlaði fíggjartørvurin fyri arbeiðið er mettur til kr. 200.000,- sambært fíggjarligu uppgerð j.nr. 16/04347-3 og er ynskið at taka av tilboð frá PB-Consult at gera uppskot til loysn. J.nr. 16/04347-1

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at játta kr. 200.000,- av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2016, konto 6875 (Kloakkir) og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

# 346/16 Kloakk í Villingardalsvegnum í samband við nýggja fjarhitaleiðing.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 29.11.2016 | 116/16 | 16/04362-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 432/16 | 16/04362-1 |
| 3 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 346/16 | 16/04362-1 |

**Málslýsing:**
Uppgradering av kloakk- og regnvatnsleiðing frá Villingadali oman í Gundadal.

Verandi kloakk- og regnavtnsleiðing í Villingadalsvegnum og í Gundadalsvegnum krevur umleggingar og er í støðum ikki tíðarhóskandi at taka í móti vaksandi kloakk- og regnvatnsnøgdum. Somuleiðis er økið fram við Villingadalsvegnum óbygt byggiøki A1 og A3. Tað er tí eitt ynski frá at Tórshavnar kommuna fyrireikar seg at taka ímóti og leiða burtur kloakk og regnvatn.

Fjarhitafelagið fer í gongd við at leggja nýggja fjarhitaleiðing frá Blómubrekku oman í Gundadal, hetta er eitt umfatandi grevstrararbeiði og mælt verður til at Tórshavnar Kommuna í hesum sambandi leggur kloakk og regnvatn samstundis sum hetta arbeiðið fer fram.

Ynski er at lýsa tørvin nágreiniligt og lata gera eitt skitsuprojekt og loysn sum støða kann takast til hvussu farast skal fram.

Fíggjarlig viðurskifti:
Samlaði fíggjartørvurin fyri at gera eitt skitsuprojekt, er mettur til kr. 220.000,- sambært fíggjarligu uppgerð j.nr. 16/04362-2 og er ynskið at biðja SMJ at gera arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at játta kr. 220.000,- av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2016, konto 6875 (Kloakkir) og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

## 347/16 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 115/16 | 16/00040-1 |
| 2 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 70/16 | 16/00040-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 151/16 | 16/00040-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 119/16 | 16/00040-1 |
| 5 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 155/16 | 16/00040-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 167/16 | 16/00040-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 232/16 | 16/00040-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 301/16 | 16/00040-1 |
| 9 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 191/16 | 16/00040-1 |
| 10 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 240/16 | 16/00040-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 307/16 | 16/00040-1 |
| 12 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 285/16 | 16/00040-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 392/16 | 16/00040-1 |
| 14 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 347/16 | 16/00040-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 436/16 | 16/00040-1 |

**Málslýsing:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Framlagt og góðkent.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Framlagt og góðkent.

Roknskapirnir fyri mai, juni og juli verða lagdir fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Framlagt og góðkent.

Roknskapirnir fyri august og september verða lagdir fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri oktober verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Roknskapurin fyri oktober framlagdur og góðkendur.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Roknskapurin fyri oktober framlagdur og góðkendur.

## 348/16 Umbøn um eykajáttanir fyri 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 386/16 | 16/04262-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 319/16 | 16/04262-1 |
| 3 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 348/16 | 16/04262-1 |

**Málslýsing:**
Sambært játtanarreglunum hjá kommununi kann meirnýtslan í mesta lagið vera 5% av nettojáttanini. Framskrivingar vísa, at nøkur rakstrarstøð fara at hava eina meirnýtslu omanfyri 5%.

**Tilmæli:**
Tilfar kemur til fundin

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Samtykt at taka undir við niðanfyristandandi uppskoti til eykajáttan, ið skal fíggjast av meirinntøkum av felagsskatti, og beina málið í býráðið til viðgerðar tvær ferðir saman við eini nærri lýsing av einstøku játtanunum:

| **Uppskot til eykajáttan 2016** | | |
|---|---|---|
| | | |
| Rakstrarstað | Viðmerking | Eykajáttan |
| Rakstur | | |
| § 2 3213 Sysktinaavsláttur | 2,3 mió. kr. eykatørv | 2.200.000 |
| § 5 5110 Musikskúlin | Hall frá eldri árðum | 400.000 |
| § 5 5710 Uttandura vallir | | 1.300.000 |
| § 6 8110 Vegir | | 800.000 |
| §6 8111 Reinhald | | 1.500.000 |
| § 6 8112 Asfalt | Er áður flutt til kavarudding | 1.000.000 |
| § 6 8113 Ferðsla | | 800.000 |
| § 7 7210 Brandstøðin | Eyðkatørv á 150.000 | 150.000 |
| Rakstur íalt | | 8.150.000 |
| Løgur | | |
| § 5 5275 Kvøld og Listaskúlin | | 234.000 |
| § 5 5375 Mullers pakkhús | | 1.900.000 |
| § 6 6275 Lestraríbúðir, dren og kloakkir | | 1.000.000 |
| Løgur íalt | | 3.134.000 |
| **Íalt** | | **11.284.000** |

**Ískoyti:**
Vísandi til samtyktina hjá fíggjarnevndini tann 16. november 2016, er gjørd útgreinað yvirlit yvir eyka játtanartørvin fyri 2016 samb. niðanfyristandandi:

**Umbøn um eykajáttan fyri rakstrarstøð**

**§ 3 Børn og Ung**
*3213 Systkinaavsláttur*
Upprunaliga varð ov lítið sett av til systkinaavsláttur, og verður tí biðið um eykajáttan á kr. 2,3 mió. soleiðis, at samlaða játtanin kemur upp á kr. 9,7 mió.

**§ 5 Mentan og frítíð**
*5110 Tórshavnar Musikkskúli*
Játtanin fyri 2016 væntast at halda, men Musikkskúlin hevur framflutt hall frá undanfarin árum. Til tess at útjavna hallið veðrur biðið um eykajáttan á kr. 0,4 mió.

*5710 Uttandura vallir*
Kontan hevur pr. ultimo eina meirnýtslu uppá 76%, liniert framroknaður eykajáttanartørvur fyri 2016 er uml. kr. 1,3 mió., tá er hædd tikið fyri útreiðslum til fimm ára garantisýn av ljósmastrunum á Tórsvølli. Meirnýtsla kr. 179.000 stavar frá undanfarna fíggjarárið. Hetta er annað árið á rað, at kontan ber keyp av graslíkisvølli fyri uml. 1,7 mió. Hetta er meira enn

helmingurin av tí, sum sett er av til viðlíkahald og rakstur av øllum fótbóltsvøllunum umframt Tórsbreyt og Tórsvølli, og sum skulu lúka krøv, ið uttanhýsis partar áseta.

**§ 6 - Tekniska øki**
Framskrivingar vísa, at ávísar deildir á Tekniska økinum hava eina meirnýtslu í 2016, sum liggur omanfyri játtanina sambært játtanarreglunum.
Orsøkirnar til meirnýtslurnar eru m.a.:
Størri innkeyp av m.a. skrellispannum og upplýsingarskeltum, parkeringsátøk og støðulýsingar. Játtanin til reinhald er ov lág í mun til virksemi. Biðið verður um eykajáttan uppá íalt 3,1 mió. kr.
Harumframt verður biðið um 1 mió. kr. til 8112 Asfalt sum áður er flutt til 8114 kavarudding.

| | |
|---|---|
| 8110 Vegir | kr. 800.000 |
| 8111 Reinhald | kr. 1.500.000 |
| 8113 Ferðsla | kr. 800.000 |
| 8112 Asfalt | kr. 1.000.000 (er áður flutt til kavarudding) |

**§7 Kommunal virki**
*7210 Brandstøðin*
Brandstøðin væntar eina meirnýtslu fyri lønir í 2016. Meirútreiðslurnar á lønarøkinum eru í samband við langtíðarsjúku, sum hevur við sær, at Brandstøðin skal seta eyka starvsfólk inn í staðin. Væntaða meirnýtslan á økinum er kr. 150.000.

**Umbøn um eykajáttan fyri løgur**

**§ 5 Mentan og frítíð**

*5275 Kvøld og Listaskúlin*
Umbyggingin av Tórshavnar Kvøld og Listaskúla tørvar eina eykajáttan á kr. 234.000. Til umbyggingina eru fluttar kr. 1.050.000 frá rakstri umframt, at restupphæddin frá fyrru umbygging skuldi nýtast til seinnu umbyggingina. Upprunaliga varð mett, at kr. 292.000 lupu av í samband við fyrru umbygging. Endaliga uppgerðin vísir at kr. 57.000 leypa av, og vantar sostatt kr. 234.000 í íløgutørvin til seinnu umbygging.

*5375 Tilboð og tiltøk innan mentan og frítíð (íløgur)*
Mullers Pakkhús - umvæling
Umbøn um eykajáttan kr. 1,9 mió. kr. er ætlað liðugtgerð av umvælingararbeiðinum. Upphæddin skal nýtast til nýggja vatnleiðing til húsið eitt nú í sambandi við sprinklaraskipanina og brunaviðurskifti annars. Harumframt skulu tvær rýmingarleiðir gerast til ovaru hæddirnar.

**§ 6 Tekniska økið**
*6275 Fríðkan av kommununi*
Klimaskermur og uttanumøkið, "kommunuskúlin
Játtanin er ætlað til at grivið verður fyri verandi bygningi og dren lagt um fundament, samstundis verður nýggj takvatnsleiðing gjørd um allan bygningin. Kloakkviðurskifti verða gjørd í stand, soleiðis at tey lúka krøv frá byggivaldinum, herundir nýtt reinsiannlegg móti Tórsgøtu. Nýtt asfalt er íroknað prísin. Mettur kostnaður er 1 mió. kr.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

# 349/16 Skúlabygnaður fyri framtíðar miðbýarskúla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 30.11.2016 | 305/16 | 16/02542-10 |
| 2 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 349/16 | 16/02542-10 |

**Málslýsing:**
Á býráðsfundi 16. juni 2016 (mál 15/04635) varð samtykt at seta serstakan arbeiðsbólk umboðandi skúlastýrini fyri Sankta Frans skúla, Skúlan á Fløtum og Eysturskúlan við hvør sínum umboði og einum umboði fyri mentamáladeildina at viðgera og gera tilmæli um niðanfyri standandi:

1. Uppskot til skúlabygnað fyri framtíðar miðbýarskúla, herundir møguliga framhaldsdeild, ið eisini tekur atlit at skúlabygnaðinum í kommununi annars, umframt atknýttum tilboðum so sum forskúla, frítíðarskúla og klubbtilboði.

2. Uppskot til, hvussu skúlabygningar í miðbýnum kunnu nøkta hølistørvin samsvarandi pkt. 1, herundir tørv á møguligum dagføringum og umvælingum.

Samtykt varð eisini, at arbeiðsbólkurin skuldi lata tilmæli í seinasta lagi 30. november 2016. Tilmælið verður latið øllum skúlastýrunum at viðgera samsvarandi fólkaskúlalógini § 52, stk. 4, og sum síðani og í seinasta lagi 1. mars 2017 letur býráðnum sítt tilmæli.

Arbeiðsbólkurin er liðugur við sítt arbeiði. Uppskot frá arbeiðsbólkinum um skúlabygnað fyri miðbýarskúla er hjálagt (16/02542-11).

Bólkurin er ikki samdur um øll tilmælini. Meirilutin eru umboðið fyri skúlastýrið í Skúlanum á Fløtum, umboðið fyri skúlastýrið í Eysturskúlanum og umboðið fyri mentamáladeildina. Minnilutin er umboðið fyri skúlastýrið í Sankta Frans skúla.

Arbeiðsbólkurin ger vart við, at ásetta tíðarfreistin fyri hoyring hjá skúlastýrunum er óheppin, tí árliga freistin fyri fráboðan hjá skúlunum til Mentamálaráðið um næmingatal er 1. februar. Henda fráboðan er grundarlag undir tímajáttan fyri komandi skúlaár. Tað er týdningarmikið, at skúlastýrini fáa tíð at viðgera uppskotið frá arbeiðsbólkinum gjølla. Nýggj skúlastýri taka við 1. januar, og mett verður ikki, at tað er ráðiligt at stytta hoyringsfreistina. Í staðin mælir meirilutin í bólkinum til, at Tórshavnar Kommuna samskiftir við Mentamálaráðið um møguleikan at dagføra tølini um neyðugt aftaná ásettu freistina.

Tilmælini í uppskotinum um skúlabygnað fyri miðbýarskúla eru hesi:

1.A Meirilutin mælir til, at skúlabygnaðurin í miðbýnum verður, at í Sankta Frans skúla verða næmingar frá forskúla til 7. flokk. Mælt verður eisini til, at frítíðarskúli til forskúla, 1. og 2. flokk verður í Sankta Frans Skúla.

1.B Minnilutin í arbeiðsbólkinum mælir til, at framhaldsdeild verður í Sankta Frans skúla

2.A Meirilutin mælir til, at hølini í Kongagøtu verða partur av Sankta Frans Skúla, tá Skúlin á Fløtum flytur út, og at hølini verða til part av grunddeildini, bæði skúla og frítíðarskúla.

2.B Minnilutin í arbeiðsbólkinum mælir til, at hølini í Kongagøtu verða partur av Sankta Frans Skúla, tá Skúlin á Fløtum flytur út, og at hølini verða til framhaldsdeild.

3 Minnilutin í arbeiðsbólkinum mælir til, at tíðarfreistin fyri hoyring hjá skúlastýrunum verður stytt, so hon samsvarar við tíðina, tá skúlar lata inn næmingatal.

4. Arbeiðsbólkurin mælir til, at Sankta Frans Skúli verður høvuðsumvældur og nútímansgjørdur, uttan mun til, hvør niðurstøðan annars verður um hádeild.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at uppskotið verður latið skúlastýrunum, sum taka við 1. januar 2017, at viðgera samsvarandi fólkaskúlalógini § 52, stk.4, og at hoyringsfreistin hjá skúlastýrunum er 1. mars 2017

**Mentamálanevndin 30. november 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø og Sigrún Mohr, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum um at lata uppskotið til hoyringar hjá skúlastýrunum, men mælir til at hoyringsfreistin hjá skúlastýrunum er 1. februar 2017.

Ein minniluti, Jógvan Arge, krevur málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Jógvan Arge, um at heita á mentamálaráðið um at loyva framhaldsdeild í Sankta Frans skúla frá skúlaárinum 2017/18, ið fall við tveimum atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu:
Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr og Halla Samuelsen.

Greiddu ikki atkvøðu:
Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Síðan varð atkvøtt um minnilutatilmæli frá Tróndur Sigurðsson í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Greiddu ikki atkvøðu:
Elin Lindenskov, Annfinn Brekkstein og Halla Samuelsen.

# 350/16 Nýtt samstarv um ruskspannir í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.10.2016 | 59/16 | 16/03666-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 03.11.2016 | 69/16 | 16/03666-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 382/16 | 16/03666-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.12.2016 | 76/16 | 16/03666-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 425/16 | 16/03666-1 |
| 6 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 350/16 | 16/03666-1 |

**Málslýsing:**
Umsitingin hevur í eina tíð, uppá fyrispurning frá forkvinnuni í náttúru- og umhvørvisnevndini, kannað møguleikarnar fyri einum samstarvi við eksternar veitarar rundanum ruskspannir og reinføri í kommununi sum heild.

Ásannandi at kommunan ikki, á nøktandi hátt, megnar hvørki útvega nóg nógvar ruskspannir, ei heldur viðlíkahalda og tøma hesar, hevur umsitingin kannað møguleikan fyri einum samstarvi, sum kann betra um hesa tænastu til borgaran.

Í ljósinum av at kommunan júst hevur samtykt ein umhvørvispolitikk fyri Tórshavnar kommunu sum heild, hevur verið mett, at ruskspannir í kommununi og reinførið, sum ein avleiðing av manglandi støði hjá kommununi á hesum økinum, skal betrast.

Við beinleiðis íblástri úr umhvørvispolitikkinum og fleiri av átaksøkjunum, hevur verið arbeitt við at skipa kommununnar tænastu rundanum ruskspannir og reinføri í býnum, á bygdunum og í náttúruni á ein, ikki bara meira effektivari máta, men eisini uppá ein máta, har lyklaorð sum Innovation, umhvørvisvinarligt, heilsufremjandi og public awareness hava verið myndandi.

Eitt av málunum hevur sostatt verið at taka hetta málsøkið og lyfta tað inn í alheims fyribrygdið “Smart cities”.
Í stuttum kann fyribrigdið lýsast sum innovativ átøk, býir gera innan eitt bland av KT- og umhvørvisloysnum, til at virka fyri einari betri, effektivari og umhvørvisvinarligari tænastu til borgaran.

Samstarvið higartil við fyritøkuna Garbage er grundað á eitt bland av ynskjunum hjá Tórshavnar kommunu, og eini konceptmenning av ynskjunum og hugskoti hjá fyritøkuni sjálvari.

Víst verður til lýsingarskjal hjá fyritøkuni Garbage, har útgreinandi lýsing finst um evnini eitt møguligt samstarv kann fevna um, men í stuttum kann sigast, at Tórshavnar kommuna stendur í boði eitt samstarv innan hesum veitingunum:

- Veitan, montering, rakstur og talgildan av tømingartørvi hjá ruskspannunum
- Uppstigan, viðlíkahald og reingerð av ruskspannunum
- Veitan og rakstur av serligum talgildum lýsingarruskspannum, sonevndar “G-info”
- Serskildar “tiltøk- og hátíðarhalds ruskspannum” sonevndar “G-fest”

- Uppsetan og umsiting av hesum “G-fest ruskspannunum” í sambandi við tiltøk.
- Fyriskipan og umsiting av hugtakinum um av aktivera ad-hoc skipan av fólki, til at savna rusk í útjaðaranum, býlingum, fram við vegunum og í náttúruni, sonevnd “G-Walkers”.
- Tilevnan og umsiting av Facebook- og Twitter-síðum um hugtakið.
- Samstarv um útvegan av staðseting og lendi til hølir hjá Garbage at reka kunningar- miðlan og café hølir, “G-Planet”

Samanumtikið kann sigast, at Tórshavnar kommuna við hesum kemur at seta ferð á politisku ynskir um at seta umhvørvið í hásæti, samstundis sum vit fara í holt við at taka lut í tí norðurlanda- og altjóða samstarvi, ið vit eru partur av og í summum førum hava latið tilsøgn um at vilja liva upp til. Kommunan gerst ein aktivur partur á altjóða umhvørvisøkinum.

Umhvørvispolitikkurin hjá Tórshavnar kommunu tosar um hetta. Átaksøkið í Umhvørvispolitikkinum um burturkast er eisini um ruskspannir og reinførið í kommununi.

Umhvørvisvikan í 2017 fer at snúgva seg um “Plastikk”, og harvið eru ruskspannirnar og tann hugburðstilgongd, sum tosað verður um í hesum, sera týdningarmikil.

Umhvørvispolitikkurin kann, við samstarv um G-Planet, fáa ein framskotnan sýnisglugga at miðla kunning og public awareness til borgaran.

Norðurlandasamstarvið innan høvuðsstaðir, fyriskrivar samstarv og menning innan innovativar loysnir, sum kunnu stuðla undir høvuðsstaðarsamstarvið at gerast sonevndar “smart cities”.

Heilsu- og aktiveringsátøk á trivnaðarøkinum eru í samsvari við “G-Walkers” og siðmenningina rundan um hugburðin hjá ungdóminum til rusk og burturkast.

Siðmenningin rundan um rusk og burturkast er í samsvari við tankan hjá Garbage, at fáa ungdómsfyrimyndir at promovera hetta. Appellin til ungdómin, um at vera umhvørvistilvitaði og samstundis vera hetta á ein vælumtóktan og jaligan hátt, við samtíðarinnar umgdómsstjørnum sum fyrimynd, verður mett at hava sera góð úrslit.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til at heimila umsitingini at samráðast við fyritøkuna Garbage um samstarv innan listaði økini og veitingarnar, og at leggja uppskot til sáttmála og uppskot til fígging fyri nevndina aftur á komandi fundi.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur nú, saman við Sp/f GARBAGiE, gjørt uppskot til sáttmála.

Sáttmálauppskotið fyriskipar eitt samstarv millum Tórshavnar kommunu og GARBAGiE, sum í størstan mun, skal skiljast sum eitt ískoytisátak innan verandi reinhald í kommununi.

Talan er sostatt um at økja bæði tænastu til borgaran, samstundis sum kommunan vísur vegin innan eitt av sjónligu átaksøkjunum í samtykta umhvørvispolitikkinum.

Við hesum samstarvinum flytur kommunan eisini mørkini fyri hvussu ein tænasta til borgaran kann gerast bæði inkluderandi, hugburðsfremjandi og umhvørvisvinarlig, samstundis sum loysnirnar eru nýhugsandi partur av alheims hugtakinum “Smart Cities”, ið kommunan samstarvar við okkara grannalond um, innan umhvørvi.

Mett verður, at samstarvið kemur at varpa ljós á Tórshavnar kommunu sum ein javnbjóðis luttakara í norðurlanda høvuðsstaðarsamstarvi um at gerast undangongubýur, í einum alheims samstarvi innan umhvørvi.

Samstarvið um hesar sokallaðu intelligentu ruskspannirnar, riknar og viðlíkahildnar í einari umhvørvisligari heilsu- og rørsluhugburðstilgongd, har átaksøkið, at burturbeina rusk í býarmyndini og í nærumhvørvinum hjá fólki, kemur at varpa ljós á kommununa á ein jaligan hátt.

Eitt annað er eisini, at kommunan fer við hesum undir enn eitt samstarv við vinnuna um at røkja eina tænastu til borgaran á tekniska økinum. Tekniska fyrisitingin hevur seinastu tvey árini brúkt orku upp á at støðulýsa veitingarnar, ið fyrisitingin umsitur við tí endamálinum, at kunna raðfesta og skipa seg í mun til tørv og fíggjarliga játtan. Tað hevur sostatt leingi verið eyðsæð, at reinhaldið hevur verið niðurraðfest fíggjarliga, samstundis sum ynskini og uppgávurnar eru vorðnar fleiri. Reinhaldið megnar at røkja dagligu uppgávurnar í miðbýnum og ger eitt stórt og krevjandi arbeiði í sambandi við tiltøk og hátíðarhald í miðbýnum. Men tað er eisini ein sannroynd, at bæði nøgdin og vavið á hesum tiltøkum, og stevnismiðini hjá kommununi um at gerast ein altjóðaakendur livandi býur, setur munandi hægri krøv til málsøkið, bæði í vavi, umframt í hugburði.

Sum er, er ikki talan um at verandi starvsfólk hjá Tórshavnar kommunu skulu missa arbeiðsuppgávur. Talan er um at hækka tænastustøðið.

Sum er, hevur tekniska fyrisitingin ikki umstøður at náa út í grannaløg at røkja uppgávuna kring ruskspannirnar ella reinhaldið. Í miðbýnum ger reinhaldið eitt gott arbeiði, bæði við vanligu gøtusópanini og partvís eisini við ruskspannunum. Men talan er í hesum um at hækka tænastustøðið og samstundis arbeiða fyri einari hugburðsbroyting. Og til hetta hevur tekniska fyrisitingin ikki møguleika at geva nóg nógv, sum er.

Líknandi tekniskar loysnir, sum talan er um við GABAGiE, finnast í dag, men heildarhugsanin, sum er í hesum, loysir ikki bara teknisku avbjóðingarnar, men arbeiðir samstundis miðvíst á hugburðssíðuni um at sjónliggera umhvørvishugtakið. Og tað er í stóran mun hetta, sum hevur verið styrkin í tilgongdini, og sum kann eyðmerkjast sum eitt átak innan norðurlandasamstarvið um “Smart cities-loysnir”, sum kommunan hevur ynskt at luttaka í, samstundis sum hetta varpar ljós á Umhvørvispolitikkin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin samtykkir at taka undir við sáttmálauppskotinum og at heimila umsitingini at innganga samstarvið, og at leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina at útvega 3,5 mió. kr. til endamálið árliga í eitt fimm ára tíðarskeið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 03. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Útsett.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur nú, saman við Sp/f GARBAGiE, gjørt nýtt uppskot til sáttmála. Hesa ferð er talan um sáttmála við royndar tíð uppá 2 ár.

Upphæddin er tillagað til, at hetta er ein royndarætlan, har átaksøkir og ambitiónsstøðið gerast royndarverkætlanir, sum Tórshavnar kommuna og Sp/f GARBAGiE koma at samstarva um og eftirmeta við tí endamálið at kunna fara í skipað samstarv.

Nýggja uppskotið leggur sostatt upp til at fevna um:

- Nýskapa verandi ruskspannir
- Gera allar ruskspannir talgyldar
- Software til tøming av ruskspannunum
- G-walkers rudda miðbýin (nærri avtalað við TK) hvørt vikuskifti í royndartíðini.
- Ruskspannatømingin í vikuskiftunum fer fram við El bike, sum GARBAGiE útvegar
- Sp/f GARBAGiE kemur at seta upp og reka facebook síðu og Twitter profil um skipanina og G-walkers.
- Sp/f GARBAGiE kemur at fyriskipa kunningarátøk og miðlan annars um skipanina og G-walkers.

Avtalan fevnir um royndartíð uppá 2 ár.
Kostnaðurin fyri hetta er 1,5 mió. kr. pr. ár.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin samtykkir at taka undir við nýggja sáttmálauppskotinum og at heimila umsitingini at innganga samstarvið, og at leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina at útvega 1,5 mió. kr. til endamálið árliga í eitt tvey ára royndartíðarskeið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Vísandi til, at eingin peningur er tøkur á fíggjarætlanini 2016, verður málið tikið upp aftur fyrst í 2017.

**Ískoyti:**
Sigrun Mohr, býráðslimur, biður um at fáa málið á skrá.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Tikið av skrá.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:20**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jógvan Arge | Helena Dam á Neystabø |
| Tróndur Sigurðsson | Halla Samuelsen | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Elin Lindenskov | Sjúrður Olsen |
| | Sigrún Mohr | |